# Innihaldsyvirlit


**PARTUR I** ..... 5

**VARÐAR Á LEIÐINI** ..... 5

**PARTUR II** ..... 15

**STJÓRNAR- OG UTTANRÍKISMÁL** ..... 15
- SJÁLVSTÝRISMÁL ..... 15
- VISJÓN 2015 ..... 15
- ALHEIMSGERÐ ..... 16
- EVROPAPOLITIKKUR ..... 16
- HOYVÍKSSÁTTMÁLIN ..... 16
- MILLUMLANDASAMSTARV Í FAO OG OECD ..... 17
- TJÓÐARBRANDING ..... 17
- SJÁLVBERANDI MENNING ..... 17
- MENNINGARSAMSTARV ..... 18
- SENDISTOVUR FØROYA ..... 18
- TRYGDARPOLITISK MÁL ..... 19
- MARKNAMÁL ..... 19
- SÁTTMÁLI UM RÆTTINDI TEIRRA BREKAÐU ..... 19

**FÍGGJAR- OG BÚSKAPARMÁL** ..... 20
- BÚSKAPAR- OG FÍGGJARPOLITIKKUR ..... 20
- YVIRSKIPAÐUR FÍGGJARKARMUR FYRI LAND OG KOMMUNUR ..... 21
- EFTIRLØNIR ..... 21
- EINSKILJINGAR ..... 21
- SKATTA- OG AVGJALDSØKIÐ ..... 22

**FISKIVINNU- OG SJÓVINNUMÁL** ..... 22
- LÓGIN UM VINNULIGAN FISKISKAP ..... 23
- HJÁVEIÐA ..... 23
- MILLUMLANDASAMSTARV OG SAMRÁÐINGAR UM HAVTILFEINGI ..... 23
- SÍNÁMILLUM FISKIVEIÐUSAMSTARV ..... 24
- HVALAVEIÐUMÁL ..... 25
- GRANSKING OG MENNING ..... 25
- TILBÚGVING ..... 25
- SKIPAEFTIRLIT ..... 26
- FØROYA ALTJÓÐA SKIPASKRÁSETING (FAS) ..... 26

**VINNUMÁL** ..... 26
- VINNULÓGGÁVA OG VINNUPOLITKKUR ..... 26
- ALING ..... 27
- LANDBÚNAÐUR ..... 27
- TRYGGING ..... 27
- VINNUGRANSKING ..... 27
- VINNUFRAMI ..... 28
- SAMFERÐSLUÆTLAN ..... 28
- NÝGGJ HAVNALÓG ..... 28
- KT-NÝTSLA ..... 28
- FERÐSLUTRYGD ..... 29

FLOGFERÐSLA ... 29
OLJA OG ORKA ... 29
ARBEIÐSSKAÐATRYGGING ... 30
ARBEIÐSMARKNAÐARKOMMISSIÓN ... 30
EINSKILJINGAR ... 31

**MENTAN, UNDIRVÍSING OG GRANSKING ... 31**
FÓLKASKÚLIN ... 31
SERNÁMSFRØÐILIGAR TÆNASTUEINDIR ... 32
STUÐLAR Í FÓLKASKÚLANUM ... 32
UNDIRVÍSINGARPORTALUR ... 32
FRÍSKÚLI ... 33
SSP ... 33
MIÐNÁMSÚTBÚGVINGAR ... 33
SKÚLABYGGING ... 33
HÆGRI LESTUR ... 34
GRANSKING OG ES-SAMSTARV ... 34
LESTRARSTUÐUL ... 34
MENTAN ... 35
KRINGVARPIÐ ... 36
ÍTRÓTTUR ... 36
KIRKJAN ... 36
NORÐURLENDSKT SAMSTARV ... 36

**ALMANNA- OG HEILSUMÁL ... 37**
ALMANNAØKIÐ ... 37
FAMILJUPOLITISK ÁTØK ... 38
ELDRAPOLITISK ÁTØK ... 38
PENSJÓNSHÆKKINGAR ... 38
BÚSTAÐARPOLITISK ÆTLAN ... 39
VÆLFERÐARRÁÐ ... 39
FÓLKAHEILSA ... 39
ALMENT ROYKIBANN ... 39
FRAMTÍÐAR SJÚKRAHÚSVERK ... 40
KRABBAMEINSVIRKISÆTLAN ... 40
ENDURVENJING OG REHABILITERING ... 40
NÝGGJ SJÚKRAKASSASKIPAN ... 40
PSYKIATRISKA ØKIÐ ... 40
BYGGIVIRKSEMI ... 41
TALGILDINGIN Á ALMANNA- OG HEILSUØKINUM ... 41

**INNLENDISMÁL ... 41**
ÚTLENDINGAMÁL ... 41
RÍKISLÓGGÁVA ... 42
STRANDFARASKIP LANDSINS ... 42
KOMMUNUMÁL ... 42
UMHVØRVIS-, LENDIS- OG NÁTTÚRUMÁL ... 43
ALTJÓÐA UMHVØRVISSÁTTMÁLAR ... 43
BÝARSKIPANARLÓG ... 43
NÁTTÚRUVERNDARLÓG ... 43
TINGLÝSINGIN ... 44
FÓLKAYVIRLIT ... 44

**PARTUR III** ........ 45

**LØGLISTI** ........ 45
LØGMANSSKRIVSTOVAN ........ 45
FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ ........ 45
FISKIMÁLARÁÐIÐ ........ 46
VINNUMÁLARÁÐIÐ ........ 46
MENTAMÁLARÁÐIÐ ........ 47
ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ ........ 48
INNLENDISMÁLARÁÐIÐ ........ 50

# PARTUR I

## Varðar á leiðini

Ólavsøkudagur er hátíðardagur. Skrúðgongan fer úr Tinghúsinum oman í Dómkirkjuna til gudstænastu og síðan niðan aftur á Tinghúsvøllin til kórsang, áðrenn Løgtingið verður sett. Hetta er eitt hitt mest tignarliga og litfagra íkastið til tjóðarhátíð okkara. Men ongantíð áður hevur tað kenst hátíðarligari enn í dag, nú vit stigu inn um gáttina í eini føroyskari kirkju. Ólavsøkudagur 2007 fer í søguna sum dagurin, tá vit tóku ábyrgd av týdningarmesta mentanarstovni landsins – kirkjuni – sum er tann grundvøllur, samfelag okkara byggir á.

Ólavsøkugudstænastan er ímynd av tí tætta sambandi, sum gjøgnum øldir hevur verið millum kirkjuna og politiska og umsitingarliga valdið. Í skrúðgonguni hava vit pláss eftir tí tign, sum skipanin lutar okkum. Men fólkið, mannfjøldin, ið tekur ímóti okkum við Tinghúsvøllin – kvinnur, menn og børn – tey minna okkum á, at tignin hevur lítlan týdning, kenna vit ikki ta djúpastu eyðmýkt og ábyrgd fyri teirri uppgávu, okkum er litin upp í hendi: at tæna landi og fólki.

### Kirkjan

Tað eru tvinnanda viðurskifti, sum serliga frøa meg í dag. Annað er, at vit loksins hava yvirtikið kirkjuna og við henni málsøkið við trúarsamfeløgunum. Hitt er, at full semja er um hesa yvirtøku. Hetta er ein viðurkenning av tí serstaka plássi, ið fólkakirkjan eigur í okkara samfelag. Neyvan hevur nøkur onnur yvirtøka størri symbolskan og mentanarligan týdning.

Fara vit 100 ár aftur í tíðina, vóru flestu føroyingar kirkjufólk. Í dag hoyra um 15% av fólkinum til onnur trúarsamfeløg. Ein partur av ábyrgdini, vit nú hava tikið við, er eisini at skapa góðar og tryggar karmar fyri hesi trúarsamfeløg.

Sum Jákup Dahl, próstur, skrivar, so vórðu gomlu kirkjurnar altíð reistar niðri á bakkanum ella tætt við lendingina. Kirkjan skuldi vera tað seinasta, menn sóu, tá ið teir fóru til útróðrar, og tað fyrsta, sum dagaði undan, tá ið bátur aftur nærkaðist bygdini.

Kirkjan var stavnhaldið, og hon er tað framvegis tann dag í dag. Hon er trygg, tá ið alt annað svíkur, og hon er karmurin um størstu eydnu og ytstu sorg í lívi okkara.

Hóast vit nú hava tikið alla umsitingarliga og fíggjarliga ábyrgd av kirkjuni, hevur hon í øldir verið føroysk. Fólkið hevur trúliga tænt kirkjuni, og hennara fólk hava trúliga tænt okkum – prestar, deknar, kirkjutænarar og onnur, ið hava verið knýtt at ymiskum arbeiði hjá kirkjuni og andaligum hjálparfelagsskapum. Trúgvin var ein heilt natúrligur partur av gerandisdegnum. Ólavsøkan speglar henda veruleika. Tí hevur tað so ómetaligan týdning, at kirkjan fremur andsfrælsi og tolsemi, um ólavsøkan eisini í framtíðini skal vera tann kristna høgtíð, sum vit vilja verja og varðveita.

Kirkjan er aðalvarðin yvir yvirtøkur hjá hesi samgonguni.

### Samanumtøka

Hetta er fjórða og seinasta løgmansrøðan í hesum valskeiðnum. Tí taki eg saman um nøkur av teimum størru málunum, vit settu okkum, tá vit skipaðu samgongu í februar 2004. Sjálvstýrismálið skuldi leggjast í fastan karm, soleiðis at orka aftur kundi brúkast til at betra um viðurskiftini hjá borgarunum og fáa búskapin aftur á rætt kjøl. Tað eydnaðist. Og tað

eri eg fegin um, hóast fleiri týdningarmikil mál framvegis liggja sum avbjóðingar. Avbjóðingar, ið vit eru til reiðar at taka, bæði í hesi tingsetuni og eftir næsta val.

**Stabilitetur**

Í fyrstu løgmansrøðu míni segði eg, at "Breiða semjan," sum samgonguskjalið varð kallað, legði upp til, at vit fingu politiskan stabilitet og arbeiðsfrið, tí tað eru avgjørdar fyritreytir fyri at røkka settum málum. Onkur vildi tá vera við, at stabilitetur og arbeiðsfriður í roynd og veru merkja, at als einki hendir. Men soleiðis hevur ikki verið í hesum føri, tí hetta landsstýri og henda samgonga hava tikið nógvar týdningarmiklar avgerðir og framt nógv mál í verki.

**Sjálvstýrismálið**

Vit vildu leggja sjálvstýrismálið soleiðis til rættis, at øll tilgongdin kom á føroyskar hendur, so at tað ikki longur var eitt øsingarmál, har stríð við danskar myndugleikar var einasta úrslitið. Sjálvstýrið skuldi vera mál fyri føroyingar. Í 2004 brúkti eg orðalagið, at vit skuldu yvirtaka sjálvstýrismálið.

Hetta eydnaðist við yvirtøkulógini, ið heimilar føroyskum myndugleikum einsamøllum at yvirtaka málsøki, eisini málsøki, ið fyrr ikki kundu yvirtakast. Við yvirtøkulógini hava vit yvirtikið fjølmiðlaábyrgdarlógina, tilbúgvingina, flogvøllin og í dag fólkakirkjuna. Gaman í hava vit dúgliga kjakast um yvirtøkuna av kirkjuni, men tað hevur verið millum føroyingar, tí vit ynsktu, at allir partar skuldu koma til orðanna í hesum týdningarmikla máli. Einasta mál, ið eftir er at yvirtaka sambært samgonguskjalinum, er vinnufelagslóggávan. Hon verður yvirtikin 1. januar 2008.

Álitið um stjórnarskipan Føroya varð handað mær beint fyri jól í fjør. Álitið hevur uppskot um, hvussu samfelagið skal skipast, og tað lýsir, hvussu føroyingar skulu bera seg at, um teir fara at nýta sín sjálvsavgerðarrætt at siga upp verandi ríkisrættarligu støðu. Til tess at tryggja, at uppskotið til eina stjórnarskipan er nóg greitt at leggja fyri Løgtingið, havi eg, eftir ráðførslu við floksformenninar, latið tinginum uppskotið at meirviðgera í serligari tingnevnd.

Við uttanríkispolitisku lógini hava vit fingið grundreglur fyri, hvussu vit samvinna við onnur lond og altjóða felagsskapir á øllum yvirtiknum málsøkjum. Vert er at geva gætur, at tað her snýr seg um virkismøguleikar á einum týðandi málsøki, sum vit ikki hava yvirtikið.

**Búskapur**

Tá vit tóku við í 2004, var stígur í búskapinum. Vit drógust við hall á fíggjarlógini, og útlitini vóru alt annað enn góð. Men landsstýrið setti sær fyri at reka ein arbeiðsskapandi og ekspansivan fíggjarpolitikk, sum eisini eydnaðist til fulnar. Hallið á fíggjarlógini vendist til avlop, og største avbjóðingin í løtuni er at tálma nógvu ferðini á búskapinum. Arbeiðsskapandi fíggjarpolitikkurin hevur tænt sínum endamáli og má nú tillagast so, at búskapurin ikki verður ovurhitaður. Her má landsstýrið sjálvandi ganga á odda, men neyðugt er eisini, at kommunurnar vísa ábyrgd, tí tær ráða yvir umleið helvtini av skattainntøkunum.

Hyggja vit eitt sindur at hagtølum, búðu 48.451 fólk í Føroyum tann 1. juni – sløk 200 fleiri enn somu tíð í fjør. Vøksturin stavar frá methøgum burðaravlopi, meðan tað var ein nettofráflyting av landinum. Arbeiðsloysið er í dag so at siga onki. Serliga er støðan í útjaðaranum batnað, eitt nú í Suðuroynni, har arbeiðsloysið er minkað úr umleið 8% niður í knapt 3% seinastu trý árini. Samlaða lønarútgjaldingin vaks við umleið 7% í 2006.

Bruttotjóðarúrtøkan, ið nú er umleið 11 mia. kr., vaks við 10% í fjør, og væntandi verður vøksturin í ár omanfyri 8%.

Vit hava í fýra ár á rað havt hall á handilsjavnanum, sum fyri stóran part er íkomið av skipakeypum og øðrum íløgum. Men hallið á handilsjavnaðinum í fjør uppá 800 mió. kr. stóðst kortini í serligan mun av stórum privatum eftirspurningi og einum minni vøkstri í útflutninginum.

## Skattalættar

Sum liður í arbeiðsskapandi fíggjarpolitikkinum var ætlan um skattalættar løgd fyri alt valskeiðið. Ivaleyst kann man í dag spyrja, um tað var rætt at fremja slíka ætlan fyri eitt heilt valskeið í senn, tí á henda hátt ber verri til at leggja upp fyri búskaparligum sveiggjum, ið ofta koma heldur brádliga í okkara samfelagi.

Ikki óvæntað fingu skattalættarnir hjá samgonguni drúgva og hvassorðaða móttøku. Tað ber altíð til at finna skeivleikar og okkurt, sum kundi verið øðrvísi frágingið í slíkum málum. Men eitt aðalmál var at hækka loftið fyri, nær ymsu inntøkurnar vórðu toppskattaðar. Áðrenn fyrsta skattalættan var hetta loft 185.000 kr. Hetta loft verður komandi árskifti 270.000 kr., og tá kunnu eisini handverkarar og onnur fólk við miðalinntøku sleppa undan toppskatti av seinast vunnu krónunum.

Í løtuni arbeiðir landsstýrið við einum nýggjum og áhugaverdum skattapolitiskum uppskoti, ið minkar um misjavnan millum ymsu inntøkubólkarnar og misjavnan millum øki í landinum.

## Samhaldsfasti

Skattalættarnir hava hingið óloysiliga saman við hækkingunum í inngjøldunum til Samhaldsfasta. Útgjaldið úr Samhaldsfasta var, áðrenn vit tóku við, 697 kr. um mánaðin. Nú er tað 1.860 kr., og verður 2.200 kr. um mánaðin frá 1. januar 2008. Hetta merkir, at ein stakur pensjónistur, sum onga aðra inntøku hevur, fer upp á 9.345 kr. um mánaðin, stavandi frá fólkapensjón, pensjónsviðbót og Samhaldsfasta. Samsvarandi pensjón fyri eini hjún verður 15.633 kr. um mánaðin.

Hesar pensjónshækkingar kennast av sonnum sum virðiligir varðar á vegnum.

## Vælferð

Politikkur snýr seg um at skapa vælferð fyri tað einstaka menniskja. Hetta er serliga áleikandi, nú nýggjar tíðir og nýggir møguleikar lættliga kunnu breiðka munandi um gjónna millum tey ríkastu og tey, ið ikki megna at fylgja við. Tað er okkara skylda at tryggja, at hesi ikki detta niður ímillum.

Kjarnuuppgávurnar í tí góða samfelagnum hava fylt nógv í politiska arbeiðinum. Her hugsi eg eina mest um framdar batar og nýskapan á skúlaøkinum, almannaøkinum og á heilsuøkinum.

## Skúlin

Fólkaskúlin, okkara skúlapolitiski grundvøllur, skalv, tá úrslitið av PISA-undankanningini kom undan kavi. Tað hevði við sær, at stórt spurnartekin varð sett við dygdina á okkara fólkaskúla. Uttan at leypa framav, varð støðan eftirmett, og fleiri uppskot at betra um fólkaskúlan vórðu orðað. Ein partur av teimum er longu settur í verk. Millum annað verður tímatalið í byrjanarundirvísingini næstu tvey skúlaárini økt við til samans 16 vikutímum.

Játtanin til fólkaskúlan er økt við 33 mió. kr. í hesum valskeiðnum. Partur av hesi upphædd er til sáttmálabundnan lønarvøkstur. Sernámsfrøðiliga økið er økt við 16 mió. kr., harav 5 mió. kr. eru fluttar frá Almanna- og heilsumáláráðnum til stuðlar hjá børnum við serligum tørvi. Játtanin til Skúlabókagrunnin er hækkað 4 mió. kr.

Fleiri íløgur í skúlar verða eisini framdar. Samtykt er at byggja nýggjan miðnámsskúla í Marknagili, Tekniski skúlin í Klaksvík verður liðugt útbygdur í ár, Skúladepilin í Suðuroy verður liðugur á sumri 2008, og Fiskivinnuskúlin í Vestmanna verður liðugur fyrst í 2009.

### Familjupolitisk átøk

Burðaravlopið í Føroyum er nú størri enn nakrantíð, heili 2,6 børn í miðal fyri hvørja kvinnu í barnførum aldri, og er hetta tað mesta í øllum Evropa. Tað er tekin um, at fólkið trívist og hevur góðar vónir fyri framtíðina.

Tá tað snýr seg um sjúkradagar hjá børnum, fer landsstýrið at leggja fram lógaruppskot um at tryggja tímaløntum endurgjald fyri inntøkumiss í sambandi við fyrsta sjúkradag hjá barninum. Landsstýrið fer eisini at koma við uppskoti um at veita serligt barnaískoyti til stakar uppihaldarar.

Bøtt er munandi um lestrarstuðulin. Barnsburðarfarloyvisskipan er sett í verk, og frá 1. august fáa lesandi 600 kr. meira um mánaðin í studningi fyri hvørt barnið. Harumframt er rentan av lánum í lestrartíðini minkað úr 4% í 2%.

Bústaðarpolitiska ætlanin, sum er partur av familjupakkanum hjá landsstýrinum, verður nú sett í verk. Við hesum verður tað til dømis lættari hjá ungum familjum og fólki, ið ikki eru so væl fyri, at seta føtur undir egið borð.

### Almannamál

Á eldraøkinum er talið á bústøðum økt munandi kring landið. Higartil í valskeiðnum eru 133 nýggj pláss tikin í nýtslu, og tilsagnir eru givnar at gera 145 nýggj pláss komandi trý árini. Samanlagt eru hetta 278 pláss.

Nú verður eisini farið undir at dygdarmenna eldrarøktina við at betra um tænastur og tilboð bæði til búfólk á røktarheimum, sambýlum og til heimabúgvandi.

Grundarlag er fingið til vegar at skipa bútilboð til heimleys í tøttum samstarvi við sjálvbodnar felagsskapir.

### Psykiatriska økið

Sera stórur tørvur er á at bøta um umstøðurnar hjá sálarsjúkum. Tí fegnist eg veruliga um, at fleiri frambrot eru hend við viðgerðar-, bústaðar- og virknistilboðum til hesi fólk. Játtanin til sosialpsykiatri er hækkað úr 7,8 mió. kr. í 18,4 mió. kr. seinastu fýra árini.

Landsstýrið hevur tikið stig til at orða tíðarhóskandi lóg um rættindi hjá sálarsjúklingum.

### Heilsumál

Fólkaheilsa hevur staðið frammarlaga í hesum valskeiðnum, bæði við átøkum fyri øktum likamsvirkni og heilsugóðum kosti. Fyribyrgingarpolitikkurin móti royking hevur vunnið undirtøku allastaðni, og landsstýrið fer at gera almenna rúmið í Føroyum roykfrítt frá 1. januar 2008.

Í heyst verður ætlan um nýggja rehabiliteringsskipan løgd fram, og landsstýrið fer eisini at gera heildarætlan fyri fólk við krabbameini.

Nýggj læknavakt er fingin at virka fyri alt meginøkið, og hetta er munandi bati í trygdini í primeru heilsutænastuni. Talgild heilsuskipan er eisini tikin í nýtslu, og við árslok 2008 fara allar eindirnar í heilsuverkinum at brúka skipanina.

### Fiskivinnan

Landsstýrið hevur í fleiri umførum viðgjørt lógina um vinnuligan fiskiskap við atliti at grundleggjandi staðfestingum um ognarrætt, gildistíð, brúksskyldu og leiklutin hjá útlendskum íleggjarum í høvuðsvinnuni. Hóast vit enn ikki eru komin á mál á hesum viðbrekna øki, hava vit framt týdningarmiklar broytingar.

Fyri tað fyrsta er sonevnda 10-ára rullandi skipanin steðgað, so at verandi fiski- og veiðuloyvi fara úr gildi 31. desember 2017. Vit hava fingið greiðari reglur fyri eigarapartin hjá útlendskum feløgum, soleiðis at fult samsvar verður tryggjað millum eigarapart, nevndarumboðan og vinningsbýti. Harafturat er lóg sett í gildi, ið forðar fyri, at veiðuloyvi og rættindi verða savnað á ov fáum hondum.

Hesar broytingar eru øll skilagóð stig á leiðini ímóti eini meiri fullfíggjaðari fiskivinnuumsiting.

Sonevndi "fiskapakkin," sum skuldi minka um útflutningin av óvirkaðum fiski, hevur tænt sínum endamáli, tí seinastu tíðina er minni av óvirkaðum fiski flutt beinleiðis av landinum enn árini frammanundan.

Í hesum valskeiðnum er tað eydnast at fáa fleirtjóðaavtalur um bæði svartkjaft og sild. Sostatt er kongafiskurin einasti ferðandi fiskastovnur, ið eftir er at gera avtalu um.

Aftur í ár eru fiskifrøðiligu metingarnar daprar, serliga um toskastovnin. Bæði Fiskirannsóknarstovan og fiskidaganevndin mæla tí til at skerja veiðuna nógv.

Vit mugu ikki seta kikaran fyri blinda eygað í hesum máli, men taka tilmælini til eftirtektar, um ikki heilt, so lutvíst. Um eina løtu fer landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum at leggja fram uppskot um, hvussu landsstýrið vil skipa fiskivinnuna komandi ár.

### Vinna annars

Landsstýrið hevur framt nýggja lóggávu um landsjørð, um búnaðargrunn, um ferðslu og um kapping, og nýggj lóggáva um trygging verður løgd fram í dag.

Á KST-økinum verður arbeitt við at leggja fipurkaðal til umheimin við Shefakaðalinum. Tá ið vit hava rokkið hesum máli, verður fipurkaðal lagdur í hvørt hús.

Stórur framburður er í alivinnuni, og alt bendir á, at alingin nú er lívfrøðiliga og búskaparliga betri fyri enn áður. Umframt laks og síl er nú eisini ferð við at koma á toskaalingina.

### Arbeiðsmarknaður

Á arbeiðsmarknaðarøkinum hevur valskeiðið eisini verið úrslitaríkt, fyrst og fremst, tí samstarvið millum landsstýrið og partarnar á arbeiðsmarknaðinum hevur verið sera gott. Størsta frambrotið er uttan iva skipanin við fasta gerðarrættinum, har ivamál í sáttmálaskeiðnum verða avgreidd. Harumframt eru fyri fyrstu ferð nakrantíð gjørdir fleiri ára sáttmálar á bæði privata og almenna arbeiðsmarknaðinum. Slíkt skapar sanniliga stabilitet og grundarlag undir framburði í samfelagnum.

## Samferðsla

Á samferðsluøkinum hava verið fleiri frambrot, harav nøkur vóru sett í verk í undanfarna valskeiði. Serliga eru at nevna fasta sambandið um Leirvíksfjørð, nýggi Smyril, bergholið millum Øravík og Hov, bergholið til Gásadals, samferðsluhavnin á Krambatanga, samferðsluhavnin á Syðradali og nýggjar vegagerðir, til dømis av Skála út á Strendur.

Í fyrstu ólavsøkurøðu míni segði eg, at í undanfarna valskeiði fingu vit fast samband um Vestmannasund, og í hesum skeiði fáa vit fast samband um Leirvíksfjørð. Í komandi valskeiði verður farið undir Skopunarfjørð, ið eisini verður partur av eini framtíðar Suðuroyarleið. Hetta var málið, og tað er tað framvegis. Samstundis verður arbeitt við verkætlan um fast samband millum Havnina og Skálafjørðin. Tað er av størsta týdningi, at vit velja bestu loysnirnar at skipa hesar verkætlanir.

Túratalið hjá Oyggjaleiðum er nógv økt, samstundis sum ferðaseðlaprísirnir eru munandi lækkaðir. Hetta lættir um hjá fólki og fyritøkum í útjaðaranum og økir væntandi um ferðafólkatalið.

Eitt smidligt infrakervi er fortreyt fyri kappingarføri og evnunum at tillaga seg sum framkomið samfelag.

## Mentan

Mentan okkara er fjølbroytt og sterk og megnar ivaleyst at taka við avbjóðingum í alheimsgerðini. Men samstundis, sum alheimsgerðin hevur fyrimunir við sær, er eyðsæð, at avbjóðingarnar fyri eina so lítla tjóð sum okkara eru stórar – ikki minst, tá ið hugsað verður um mál og mentan. Alheimsgerðin letur eisini upp fyri møguleikum, og tað er við stoltleika, at vit fylgja okkara gávuríku ungfólkum, ið gera vart við seg á altjóða pallinum, bæði í tónleiki, list og sniðgeving.

Sjálvboðið arbeiði er grundarlagið undir stórum parti av mentanarlívinum um landið. Týdningurin av hesum arbeiði kann ikki metast nóg høgt, og alsamt fleiri kommunur leggja seg eisini eftir at reka ein virknan mentanarpolitikk. Tað gevur úrslit.

Eitt aðalmál við Visjón 2015 er at skapa eina felags fatan av, at Føroyar eiga og kunnu vera í fremstu røð. Hetta krevur, at vit gera samróður til okkara tjóðaráhuga. At tey flestu rógva við, og tey fæstu skjóta á.

Á oyggjaleikunum á Rhodos gekk sjón fyri søgn. Okkara ítróttarfólk vísti, hvussu góð úrslit, ein fær við at seta sær stór og greið mál. Og so fer eftir málinum. Ger sær ómak. Samstarvar. Ger sítt ítasta fyri seg og felagsskapin.

Ítrótturin hevur ein høvuðsleiklut fyri okkara heilsu, trivnað og samleika. Og tí stuðlar landsstýrið sjálvandi Ítróttarsambandi Føroya, sum hevur boðið land okkara fram at verða vertur fyri Oyggjaleikunum 2015. Lat okkum gera okkara til, at hetta fer at eydnast!

## Gransking

Føroyar eiga granskarar á høgum støði, hóast tær eru langt aftanfyri onnur framkomin samfeløg, tá tað snýr seg um at seta pengar av til hetta endamál. Landsstýrið hevur tí sett fokus á hetta økið við ætlanum um at skipa Lærda Háskúla Føroya, stovnseta granskingarlund til vinnugransking og fáa eitt yvirskipað vísindaráð at virka. Ein týðandi vegur at menna føroyska gransking er at fáa í lag tættari samstarv við ES. Fyri at styrkja um hesa tilgongd hava vit sett serkøn fólk í Granskingarráðið og Mentamálaráðið at menna hetta samstarv.

Ílegugransking er nú sett á stovn, og komið er væl áleiðis at gera ættarbandsskrá.

## Umhvørvi

Landsstýrið hevur nú sett á stovn eina náttúru-, umhvørvis- og lendisfyrisiting, sum samansjóðar seks ymiskar umsitingar. Hetta fer at styrkja munandi um okkara umhvørvis- og náttúrufyrisiting.

Sum eitt tað fyrsta landið í Evropa fer landsstýrið í heyst at leggja part av skrásetingargjaldinum á bilum um til $CO_2$-avgjald, soleiðis at fólk verða eggjaði at keypa bilar, ið dálka minni.

Støða Føroya til Kyotofrumskjalið hevur verið viðgjørd á tingi í vár, og breið semja er um, at skjalið eisini skal galda fyri Føroyar. Tí verður uppskot til samtyktar um hetta lagt fyri tingið í heyst. Harumframt er ætlanin, at Føroyar skulu vera við í tilgongdini, tá altjóða krøvini til $CO_2$-útlát verða herd í næstum.

## Orka

Vit liva framvegis í vónini um eina oljuvinnu, sum nú aftur tykist nærkast. Og hóast tað framvegis bert eru vónir, so er eingin ivi um, at seinasti oljufundurin við føroyska markið gevur oljufeløgunum betri hug at finna kolvetni í føroysku undirgrundini. Skjótt verður farið at bora sætta leitibrunnin á landgrunninum. Avtala er eisini gjørd um sjeyndu leitiboringina, ið verður framd komandi tvey árini. Triðja útbjóðingarumfar verður í heyst.

Landsstýrið hevur sett sær fyri, at innan 2015 skulu 20% av orkunýtsluni á landi stava frá varandi orku, og fiskiflotin skal nýta 15% minni orku í mun til veiðunøgdina. Við nýggju elveitingarlógini hevur landsstýrið millum annað fingið heimild at skapa karmar um kapping, tá tað snýr seg um at framleiða varandi orku.

## Uttanríkispolitikkur

Í hesum valskeiðnum er nógv fingið á skafti á uttanríkispolitiska økinum. Føroyar eru vorðnar partur av evropeisku skipanini um at samstarva um uppruna, fiskavørur okkara hava fingið betri atgongd til ES-marknaðin, og sáttmáli er gjørdur við Russland, ið javnsetir føroyskar vørur við vørur úr Íslandi, Noregi og ES. Harafturat er komin nógv umrøddi Hoyvíkssáttmálin, ið skipar Føroyar og Ísland í eitt og sama búskaparøki.

Altjóðarættarligur sáttmáli um markið millum Føroyar og Ísland er staðfestur. Harafturat er avtala gjørd millum Føroyar, Ísland og Noreg um at býta landgrunnin norðanfyri uttan fyri 200 fjórðingar.

Landsstýrið hevur sett sær fyri at styrkja um støðu Føroya í Evropa.

Til tess at fremja málið, er landsstýrið farið undir at kanna møguleikarnar hjá Føroyum fyri at fáa víðkaðan samstarvsáttmála við ES og limaskap í EFTA. EFTA-limaskapur merkir, at Føroyar gerast partur av evropeiskum samstarvi og fáa atgongd til týdningarmiklar marknaðir uttan fyri Evropa. Greitt er, at tað fer at taka tíð at fáa limaskap.

Nú eru 27 lond í Evropasamveldinum. Hetta samveldi er nógv hin størsti marknaðurin fyri føroyskar fiskavørur og hevur eyðsýniliga sera stóran týdning fyri Føroyar. Tí verður støðugt roynt at styrkja um sambondini og samstarvið við ES. Bæði fyri at útvega vinnulívinum betri virkismøguleikar og fyri at fáa okkum betri møguleikar á t.d. granskingar- og útbúgvingarøkinum og í loftferðslu. Mangan er sera drúgført at fáast við stóra og tunga ES-kervið, og nógvar forðingar eru á vegnum, ikki minst á hesum seinast nevndu økjum. Her krevst politiskt tol og treiskni.

Hetta landsstýrið hevur meira enn nakað annað lagt seg eftir at skipa altjóða menningarsamstarv. Játtanin er hækkað úr 300 tús. kr. í 2004 í 3,5 mió. kr. í ár. Harumframt

er nýggj lóg og kunngerð sett í gildi, ið m.a. ásetir neyvar reglur fyri, hvussu stuðul til menningarsamstarv verður latin. Vit hava í hesum tíðarskeiði ment okkara førleika á økinum og m.a. knýtt sambond við viðurkendar felagsskapir sum matvørustovnin hjá ST, World Food Programme, við hjálparfelagsskapin Mercy Corps og við Heimsbankan.

**Sendistovan í Reykjavík**

Í kjalarvørrinum av Hoyvíkssáttmálanum hevur landsstýrið gjørt av at seta á stovn sendistovu í íslendska høvuðsstaðnum. Í hesum sambandi stóðst mikil orðadráttur um, hvar sendistovan skuldi vera, hvussu flaggast skuldi, og um nú valda sendikvinnan skuldi hava diplomatiskan status.

Samanborið við tær flaggloysnir, sum Føroyar fingu í Brússel og í London so seint sum í 2001, har einans danska flaggið og ES-flaggið veittraðu uttan fyri okkara sendistovur í rættiliga rúma tíð, so hava vit nú fingið eina nýggja skipan, sum vit eisini kunnu brúka í øðrum londum. Í Reykjavík merkir hetta, at vit fáa okkara egnu høli, har einans Merkið veittrar, samstundis sum sendikvinna okkara hevur diplomatstatus, ið gevur okkum fría atgongd til alt diplomatiska kervið í býnum.

Sendistovan í Reykjavík letur upp 15. september.

**Einskiljingar**

Einskiljingar hava staðið ovast á politisku dagsskránni alt síðan 1998; men ikki fyrr enn nú eydnaðist tað at seta hol á hesa tilgongd, tá tveir triðingar av Føroya Banka vórðu seldir.

Sølan varð grundað á breiða politiska undirtøku, og var framd júst so, sum Løgtingið og landsstýrið vildu, nevniliga við at varðveita bankan sum sjálvstøðuga fíggjarliga eind í føroyska samfelagnum og við at skráseta hann á Virðisbrævamarknaði Føroya. Harumframt skuldi sølan vera samansett, so at eisini smáir íleggjarar kundu ogna sær partabrøv. Hetta var støðan, hóast vit vistu, at hesin leistur møguliga kundi geva nakað lægri søluprís, enn um bankin varð seldur til ein og sama strategiska íleggjara.

Áhugin fyri søluni var so ovurhonds stórur, bæði heima og uttanlands, at eftirspurningurin var nógv størri enn útboðið. Tí skilji eg væl, at fólk og fyritøkur vóru ónøgd, tí tey fingu ikki nær námind av tí, tey ynsktu.

Samanumtikið haldi eg, at hesar fyrstu royndirnar eru verdar at hava í huga, tá farið verður undir at selja seinasta triðingin.

**Útlendingamál**

Útlendingamálið hevur í áravís verið ein trupulleiki, hóast roynt hevur verið at bøta um viðurskiftini. Og støðan er ikki vorðin betri, nú tað stendur á hjá vinnuni at fáa nóg mikið av arbeiðsmegi. Tí arbeiðir landsstýrið nú saman við donskum myndugleikum við at seta í gildi nýggja útlendingalóg fyri Føroyar. Henda lóg fer at gera tað lættari hjá ES-borgarum at koma til landið at arbeiða eftir teimum sáttmálum, ið galda á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Sonevnda montørreglan er longu sett í gildi og gevur útlendingum, ið koma til landið at gera ávíst arbeiði, rætt at arbeiða í Føroyum í upp til tríggjar mánaðir. Harumframt arbeiðir landsstýrið við kunngerð, ið skal áseta neyvari reglur um, hvussu føroyskir myndugleikar skulu umsita donsku útlendingalógina.

Alneyðugt er, at spurningurin um útlendska arbeiðsmegi verður greiddur í samráði við partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Hóast vit við hesum bøta munandi um støðuna, má eg ásanna, at útlendingamálini neyvan verða loyst á nóg góðan hátt, so leingi vit ikki sjálvi taka fulla ábyrgd av hesum málsøki. Hetta er eitt mál, ið verður áleikandi hjá eini komandi samgongu.

**Eftirlønarreformur**

Ein stór og umfatandi nýskapan á eftirlønarøkinum er á veg, har lagt verður upp fyri stóru demografisku broytingunum komandi árini. Nýskapanin fer at byggja á tríggjar súlur: Fólkapensjón, samhaldsfasta og uppsparingar.

Í hesum sambandi fer landsstýrið at leggja fram uppskot um nýggja pensjónsskipan, ið tryggjar øllum ein virðiligan aldurdóm. Ætlanin er at áleggja øllum persónum millum 16 og 67 ár at spara upp til egna eftirløn við at rinda til eina góðkenda eftirlønarskipan. Minstainngjaldið verður stigvíst hækkað ár um ár, til tað er vorðið hóskandi stórt.

**Valskipan**

Seinastu nógvu árini er okkara valskipan við jøvnum millumbilum tikin upp til almenna umrøða. Í seinastuni hevur tað serliga verið spurningurin um at skipa Føroyar sum eitt valdømi, ið hevur verið á breddanum.

Kommunurnar verða færri og størri, infrakervið bindur saman nærum alt landið, og harumframt samsvarar tingmannabýtið ikki við atkvøðutalið. Eg meti tí, at landið eigur at verða skipað í eitt valdømi, tó at eg væl skilji sjónarmiðini hjá teimum, ið ikki ynskja broytingar. At skipa Føroyar sum eitt valdømi er so stór og grundleggjandi broyting, at hon uttan iva eigur at verða løgd til fólkaatkvøðu, áðrenn Løgtingið tekur endaliga støðu.

**Visjón 2015**

Ein annar varði, ið er reistur í hesum valskeiðnum, er Visjón 2015. Í hesum arbeiði hevur landsstýrið tikið stig til at seta orð á, hvussu vit tryggja vælferðina í framtíðini. Arbeiðið er samlað í bókini *Mál og vegir*, har serkøn fólk úr almennu fyrisitingini, áhugafeløgum og vinnuni siga sína hugsan um, hvussu landsstýrið kann røkka síni visjón um, at Føroyar skulu vera millum fremstu tjóðir.

Henda samgonga hevur sostatt ikki einans brúkt tíðina til at loysa áleikandi mál, men hevur eisini fingið til vegar eitt grundarlag at leggja langtíðarkós fyri samfelagið. Og politisku flokkarnir, fakfeløg, áhugafeløg og onnur hava fingið eitt kelduvað av hugskotum at nýta sum íblástur, tá týdningarmiklar avgerðir skulu takast um mál, ið røkka inn í framtíðina.

Í heyst ætli eg at leggja Visjón 2015 fyri Løgtingið til aðalorðaskiftis.

*Harra formaður,*

Vit hava útint flestu mál, ið vit festu á blað í samgonguskjalinum.

Í dag kenni eg meg rættiliga sannførdan um, at vit seinastu fýra árini eru komin munandi nærri málinum um at skapa tað góða samfelagið.

Ikki ber til í hesi røðu at lýsa alt virksemið hjá landsstýrinum. Tí vísi eg til part II, har nágreiniligari verður greitt frá einstøku málunum.

Mong hava fetini verið, og vit eru komin væl fram á leið. Men enn er teinur eftir at ganga - og vit fara at laða onkran varðan afturat.

Fylg mær á fjallið, tú føroyingur reysti!
Lít yvir Føroyalands tindar og sker;
sí hvussu fuglurin fjálgar um heimið!
Góður við føðiland eisini ver!

Við hesum orðum eftir Poul F. heiti eg á allar góðar kreftir um at ganga leiðina saman við okkum.

Takk fyri og góða ólavsøku.

# PARTUR II

## Stjórnar- og uttanríkismál

### Sjálvstýrismál

Ein hin størsta avbjóðingin hjá hesum landsstýri hevur verið at leggja sjálvstýrismálið til rættis, so at øll tilgongdin verður á føroyskum hondum, heldur enn at vera trætumál millum føroyskar og danskar myndugleikar. Hetta málið er rokkið við yvirtøkulógini, umframt at nýtt grundarlag fyri samvinnu Føroya við onnur lond er fingið til vegar við uttanríkispolitisku lógini.

Við heimild í yvirtøkulógini hevur samgongan yvirtikið:

- fjølmiðlaábyrgdarøkið
- tilbúgvingina
- fólkakirkjuna
- flogvøllin í Vágum

Einasta mál, ið eftir er at yvirtaka sambært samgonguskjalinum, er vinnufelagslóggávan. Hon verður yvirtikin fyrsta januar 2008.

Álitið um stjórnarskipan Føroya varð handað løgmanni fyri jól í fjør. Í álitinum er uppskot um, hvussu samfelagið skal skipast, umframt at tað lýsir, hvussu føroyingar skulu bera seg at, um teir velja at siga upp verandi ríkisrættarligu støðu.

Eftir at løgmaður hevði umrøtt málið við formenninar í politisku flokkunum lat hann Løgtinginum uppskotið til stjórnarskipan at meirviðgera í serligari tingnevnd.

### Visjón 2015

Í junimánaði í ár fekk landsstýrið handað *Mál og vegir*, har arbeiðið við Visjón 2015 er savnað. Bókin lýsir eina ørgrynnu av málum og tilgongdum, ið serkøn fólk úr almennu fyrisitingini, vinnulívinum og áhugafeløgum halda eru neyðug til tess at veruleikagera visjónina hjá landsstýrinum um, at Føroyar skulu vera millum fremstu tjóðir í 2015. Endamálið er at menna búskapin, so at vit kunnu skapa eitt framkomið og vitandi samfelag, har vælferðin hjá øllum borgarum er tryggjað.

Í bókini eru 13 grundarsteinar – ein fyri hvørt høvuðsøki í samfelagi okkara. Teir eru alheimsgerð, útbúgving, gransking, íverksetan, kunningartøkni, tilfeingi, samfelagsbygnaður, infrakervi, umhvørvi, mentan, arbeiðsmarknaður, vælferð og sjálvstýri.

Við bókini *Mál og vegir* hava politikarar, vinnulív og áhugafelagsskapir eitt gott grundarlag at byggja á, tá ið týdningarmikil stig skulu takast á omanfyri nevndu samfelagsøkjum, bæði nú og í framtíðini.

Landsstýrið hevur longu nýtt visjónsarbeiðið sum íblástur – eitt nú tá ið vinnupolitikkurin og heilsupolitikkurin vórðu orðaðir, og tá ið gjørt varð av at seta á stovn nýggja umhvørvisstovnin. Farið er júst undir verkætlan at tjóðarbranda Føroyar, ein ætlan, ið er lýst í grundarsteininum um alheimsgerð. Harafturat fer landsstýrið eisini at taka støði í visjónsarbeiðinum, tá tað í heyst fer at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið um eitt nú Føroya

Lærda Háskúla, bústaðarpakkan, náttúruvernd og trygging móti avleiðingum av arbeiðsskaðum.

## Alheimsgerð

Alheimsgerðin tekur alsamt meira dik á seg, og heimsmarknaðurin verður meira og meira samrunnin, við øktum frælsi fyri vørur, kapital, tænastur, fólk og fyritøkur. Tí brynja Føroyar seg at taka móti avbjóðingunum, heldur enn at nýta orkuna til at síggja forðingar og at arbeiða ímóti. Tí hevur løgmaður eisini lagt stóran dent á at gera samstarvsavtalur við onnur lond og felagsskapir, og tí er so stór orka løgd í arbeiðið við Visjón 2015, ið júst setir orð á, hvussu Føroyar eiga at bera seg at til tess at klára seg væl í framtíðini.

Í norðurlandahøpi hava forsætisráðharrarnir eisini avrátt at styrkja um samstarvið um alheimsgerð. Løgmaður hevur í hesum sambandi boðað danska forsætismálaráðharranum frá, at landsstýrið vil vera virkin partur á øllum stigum í hesum samstarvi. Løgmaður fer eisini at taka upp henda spurning á komandi ríkisfundi, ið verður í Grønlandi í august.

## Evropapolitikkur

Landsstýrið hevur sett sær fyri, at Føroyar skulu gerast samrunnin partur av evropeiska innmarknaðinum og skulu styrkja handilspolitisku sambondini víðari út í heim.

Til tess at fremja málið er landsstýrið farið undir at kanna møguleikarnar hjá Føroyum fyri víðkaðari samstarvsavtalu við ES og limaskapi í EFTA.

Fundir hava verið um limaskap í EFTA, bæði á politiskum og á embætisstigi, og henda tilgongd heldur fram. EFTA-limaskapur merkir, at Føroyar gerast partur av evropeiskum samstarvi og fáa atgongd til týdningarmiklar marknaðir uttan fyri Evropa. Greitt er, at tað fer at taka tíð at fáa limaskap.

ES, ið nú telur heili 27 lond og er nógv hin størsti marknaður fyri føroyskar fiskavørur hevur eyðsýniliga sera stóran týdning fyri Føroyar. Tí verður støðugt roynt at styrkja sambondini og samstarvið við ES. Bæði fyri at útvega vinnulívinum betri virkismøguleikar, og fyri at útvega okkum betri møguleikar á t.d. granskingar- og útbúgvingarøkinum og innan loftferðslu. Mangan er sera drúgført at fáast við stóra og tunga ES-kervið, og nógvar forðingar eru á vegnum, ikki minst á hesum báðum seinast nevndu økjum.

## Hoyvíkssáttmálin

Hoyvíkssáttmálin kom í gildi 1. november í fjør. Endamálið við sáttmálanum er at gera Føroyar og Ísland til felags búskaparøki, og hetta er mest víðfevndi sáttmáli hjá báðum londum nakrantíð.

Lítið er at ivast í, at sáttmálin fer at hava stóran og gagnligan týdning fyri føroyska samfelagið, um vit annars duga at nýta teir møguleikar, sáttmálin hevur við sær. Væl kann vera, at tað enn eru snøklar, ið ikki eru loystir, men hinvegin er einki at ivast í, at vit við sáttmálanum hava fingið nýggjar møguleikar, sum vit vónandi fara at megna at gagnnýta.

Grundhugsjónin í Hoyvíkssáttmálanum hevur eisini havt gagnliga ávirkan á fiskiveiðusáttmálan, ið londini bæði gjørdu í februar, hóast sáttmálin ikki beinleiðis fevnir um fiskivinnuna.

Tvey fyrivarni vóru, tá ið sáttmálin kom í gildi. Annað var fyri sakføraravirksemi, hitt fyri drekkivørum í dósum. Á hesum økjum vóru tað Føroyar, ið ikki megnaðu at halda sáttmálan. Hesir trupulleikar eru nú greiddir.

Enn lúka vit tíverri ikki sáttmálan á tryggingarøkinum, men væntandi verður bøtt um henda vansa tíðliga í heyst.

## Millumlandasamstarv í FAO og OECD

Seinasta heyst gjørdi landsstýrið av at søkja um atlimaskap í FAO, sum er matvøru- og landbúnaðarfelagsskapur Sameindu tjóða. Avgerðin um føroyskan atlimaskap verður tikin á ráðsfundi hjá FAO í november í ár.

Við atlimaskapi fáa Føroyar beinleiðis umboðan í øllum viðkomandi nevndum hjá FAO, har tað serliga er virksemið hjá fiskivinnunevndini, COFI, ið hevur áhuga. Flestøll fiskivinnulond eru umboðað í COFI, sum eisini hevur sernevndir fyri aling og handil við fiskavørum. Atlimaskapur fer at geva okkum nógv betri møguleikar at vera við í alskyns áhugaverdum útgreiningararbeiði hjá FAO, umframt størri ábyrgd at kunna ST-skipanina væl og gjølla um okkara egnu viðurskifti sum fiskivinnutjóð.

Føroyar hava týðandi áhugamál í OECD, felagsskapinum fyri búskaparligum samstarvi og menning. Landsstýrið fer nú at umhugsa møguleikan hjá Føroyum at vera við í OECD-samstarvinum, og fyrsta stig verður helst at fáa í lag eygleiðarastøðu í fiskivinnunevndini hjá felagsskapinum. OECD kann gerast týðandi partur, tá ið ræður um at skipa fakligt grundarlag undir tiltøkum viðvíkjandi fíggjarpolitikki, tilfeingisumsiting, eitt nú fiskiríkidømi og kolvetni, kredittvirði landsins og fíggjarmarknaðum. Luttøkan kann eisini fáa stóran týdning, tá ið vit skulu skipa búskaparsamstarv við onnur lond, eitt nú í sambandi við limaskap í EFTA, ES og WTO.

## Tjóðarbranding

Farið er undir verkætlan at tjóðarbranda Føroyar, so at vit fáa eitt greiðari og sjónligari andlit í altjóða samfelagnum, bæði politiskt, vinnuliga og mentanarliga. Endamálið er, at Føroyar sum frá líður skulu vekja meira jaligan áhuga uttanlands til tess at standa betur í kappingini við onnur lond um m.a. fólk, vørur, tænastur og íløgur.

Løgmansskrivstovan fyrireikar hetta arbeiðið saman við Vinnumálaráðnum og Mentamálaráðnum. Í hesum sambandi er minni kanning gjørd í 11 viðkomandi londum um, hvussu væl fólk kenna Føroyar, og hvat tey seta land okkara í samband við. Kanningin vísir, at Føroyar eru ikki serliga væl kendar, men at tey, ið tó vita okkurt um landið, seta tað í samband við eitthvørt gott.

Í heyst verður tilmæli latið landsstýrinum um, hvussu arbeiðið skal skipast frameftir.

## Sjálvberandi menning

Landsstýrið hevur sett sær fyri at taka atlit at sjálvberandi menning á øllum samfelagsøkjum.

Farið verður tí undir at orða landsætlan fyri sjálvberandi menning. Hon skal tryggja, at búskaparmenningin er ábyrgdarfull, og at hon tekur atlit at áhugamálunum hjá framtíðar ættarliðum. Umboð fyri landsmyndugleikar, kommunur, vinnu og viðkomandi áhugabólkar fara at orða hesa ætlan. Landsstýrið ætlar í hesum sambandi at samstarva og læra av royndum hjá okkara grannalondum, ið eru sera framkomin innan sjálvberandi menning.

Veðurlagsbroytingar eru helst største avbjóðingin á økinum, og landafrøðiliga støða Føroyar ger, at landið er sera viðkvæmt fyri hesum broytingum. Ætlanin er tí at vísa í verki, at vit taka ábyrgd, eitt nú við at seta Kyotofrumskjalið í gildi fyri Føroyar, og at vera við frá byrjan, tá ið altjóða samfelagið fer at herða krøvini til $CO_2$-útlát.

Samstundis ætlar landsstýrið at dagføra ásetingarnar í Montrealsáttmálanum um at verja osonlagið. Hetta verður gjørt við at leggja uppskot til samtyktar í heyst um at taka av fyrivarnið fyri Føroyar á hesum øki.

## Menningarsamstarv

Lógin um altjóða menningarsamstarv varð einmælt samtykt á Løgtingi í vár, og kunngerð er sett í gildi, ið m.a. ásetir neyvar treytir fyri, hvussu stuðul verður latin.

Seinasta árið hevur landsstýrið stuðlað fleiri ymsum menningarverkætlanum, eins og samstarvið við altjóða hjálparfelagsskapir er ment støðugt. Samstarvað er við felagsskapin Mercy Corps um heilsuverkætlan í Indonesia, og tveir ráðgevar úr Føroyum starvaðust í Jakarta eitt skifti. Samráðst verður nú við sama felagsskap um fiskivinnuverkætlan í Banda Aceh. Í vár varð avgjørt at lata 990.000 kr. til hjálparfelagsskapin ABC-Barnahjálp til verkætlan í Liberia at byggja skúlaheim til 500 næmingar.

Gongd er komin á samstarvið við Heimsbankan um at stuðla Palauoyggjum at byggja upp eina kolvetnisumsiting.

Umframt at stuðla menningarlondum, samstarvar landsstýrið eisini við onnur um at basa fátækradømi og við at fáa til vegar kunnleika og royndir um triðja heimin. Samstundis fáa Føroyar innlit í neyðhjálp, menningarhjálp og menningarsamstarv.

## Sendistovur Føroya

Í sambandi við at Hoyvíkssáttmálin varð settur í gildi, hevur løgmaður gjørt av at seta á stovn sendistovu í Íslandi. Hon fer at virka í heyst.

Á sendistovuni í London verður í løtuni umhugsað at betra um hølisviðurskiftini, tí fleiri føroyskar fyritøkur hava víst áhuga at nýta hølini hjá sendistovuni, t.d. við at leiga seg inn. Ynskiligt er at fáa eitt slíkt samstarvsumhvørvi skipað, ið kann gerast ein samvirkin platformur fyri menning av føroyskari útflutningsvinnu á øllum økjum. Sendistovan gerst eisini alsamt meiri virkin á mentanarliga økinum. Í fjør varð føroyska sendimannaumboðanin í Bretlandi víðkað til eisini at fevna um Írland.

Í Brússel er økt um starvsfólkatalið í sambandi við arbeiðið at fremja evropapolitikkin hjá landsstýrinum, og roynt verður somuleiðis at fáa rúmligari hølir til dagliga arbeiðið. Hetta fer eisini at geva møguleikar at skipa fyri mentanarligum og vinnuligum tiltøkum, umframt at vinna, felagsskapir og myndugleikar kunnu leiga høli til virksemi sítt.

Sendistovan í Keypmannahavn tekur sær alt meiri av myndugleikauppgávum, sum eru millum føroysku og donsku stjórnarráðini, umframt at sendimaðurin røkir og mennir samband landsstýrisins við útlendsku sendistovurnar í Keypmannahavn.

Við tí endamáli at veita eina betri tænastu til útflutningsvinnuna og til fyritøkur, sum búgva seg til altjóða kapping, verður kannað, hvønn tørv vinnan og mentanarlívið hava á tænastum frá sendistovunum. Harafturat verður arbeitt við eini samstarvsavtalu millum Løgmansskrivstovuna og Samvit fyri at samskipa og gagnnýta vitanina hjá hvør øðrum.

Í uttanríkisfrágreiðing løgmans, ið verður løgd fyri Løgtingið í heyst, verður greitt gjøllari frá dagliga virkseminum á sendistovunum.

## Trygdarpolitisk mál

Radarin á Sornfelli er nú tikin niður, tí hann hevði lítlan og ongan hermálsligan týdning longur. Hinvegin verður hann mettur at hava týdning fyri sivilu loftferðsluna. Íslendskir myndugleikar, ið eisini umsita okkara loftrúm, nýta radaramyndina til tess at fylgja við ferðamannaflogførum. Tí hava íslendingar tingast við danir um at seta upp nýggjan sivilan radara. Umboð fyri landsstýrið hevur verið við í hesum tingingum. Eftir at løgmaður hevur ráðført seg við uttanlandsnevnd Løgtingsins, hevur hann boðað dønum frá, at hann tekur undir við, at teir seta nevnda radara upp í samstarvi við føroyingar.

Í vetur lat danski verjumálaráðharrin løgmanni frágreiðing um heryvirvaldið í Norðuratlantshavi, harí eisini ymisk uppskot um at broyta fyrisitingarliga bygnaðinum á økinum. Eftir at hava ráðført seg við uttanlandsnevnd Løgtingsins hevur løgmaður boðað dønum frá, at hann tekur undir við, at sum mest av fyrisitingarliga virkseminum í Føroyum og Grønlandi verður flutt til Danmarkar.

## Marknamál

Í fjør heyst varð altjóðarættarligur sáttmáli um markið millum Føroyar og Ísland staðfestur. Sostatt eru allar tvístøður um markamótini innan fyri 200 fjórðingar millum Føroyar og grannalondini loystar. Umframt við Ísland, eru marknasáttmálar eisini gjørdir við Noreg og Bretland.

Viðvíkjandi landgrunsmørkum uttan fyri 200 fjórðingar hava Føroyar, Ísland og Noreg gjørt semju um økið norðan fyri Føroyar. Harumframt hava Føroyar, Ísland, Bretland og Írland krøv um eitt øki á Hatton-Rochall leiðini í ein útsynning úr Føroyum.

Higartil hevur mesta arbeiði verið at útvega t.d. jarðfrøðiligar upplýsingar fyri at kunna skjalprógva krøv okkara og fyri at fáa ásett ytra markið á landgrunsrondini, har hon røkkur út um 200 fjórðinga markið. Eftir ætlan verða seinastu mátingarnar gjørdar norðan fyri og sunnan fyri Føroyar í summar.

Arbeiðsbólkur verður nú settur at fyrireika próvtilfarið, sum leggjast skal fyri landgrunsnevndina hjá Sameindu tjóðum. Tað hevur sera stóran týdning, at Føroyar fáa so stóra ávirkan sum gjørligt á hetta arbeiði, og landsstýrið miðar tí eftir at hava tveir limir í arbeiðsbólkinum við serfrøði í ávikavist jarðfrøði og havrætti.

## Sáttmáli um rættindi teirra brekaðu

Hin 13. desember 2006 varð altjóða sáttmálin um viðurskifti hjá brekaðum undirritaður. Sáttmálin fær gildi, tá ið 20 lond hava góðkent hann.

Sáttmálin snýr seg um búskaparlig, mentanarlig og sosial rættindi, umframt serlig rættindi til m.a. javnstøðu, atgongd, persónligt frælsi, heilsutænastur, mentanarlív, frítíð, ítrótt o.s.fr.

Løgmaður ætlar sum fyrsta stig at seta ein arbeiðsbólk at kanna, hvat skal til fyri at seta sáttmálan í gildi. Eftir summarfrítíðina verður sáttmálin umsettur til føroyskt.

# Fíggjar- og búskaparmál

## Búskapar- og fíggjarpolitikkur

Í samgonguskjalinum er ásett, at fíggjarpolitikkurin skal lagast eftir búskaparligu fortreytunum í landinum, og at avlop skal fáast aftur á fíggjarlógina. Samgongan hevur tí lagað fíggjarpolitikkin eftir hesi áseting.

Tá henda samgongan tók við, var stígur í búskapinum. Tí valdi landsstýrið at hava hall á fíggjarlógini fyrstu árini. Í 2006 kom vend í aftur búskapin, og avlop hevur verið á fíggjarlógini seinnu árini.

Vøksturin í búskaparliga virkseminum sæst serliga aftur í vaksandi lønargjaldingum, men eisini á arbeiðsmarknaðinum, har arbeiðsloysið nú næstan er fullkomuliga burtur. Arbeiðsloysið er søguliga lágt og liggur nú millum 1 og 2%. Ekspansivi og arbeiðsskapandi fíggjarpolitikkurin hevur tí tænt sínum endamáli, men fer at verða umlagdur, soleiðis at hann ikki virkar ov stimbrandi á búskaparliga virksemið.

Tað er sjálvandi ikki bert fíggjarpolitikkurin, sum stýrir gongdini í virkseminum í føroyska búskapinum. Hann er eisini nógv ávirkaður av viðurskiftum, sum ikki kunnu stýra politiskt, t.d. fiskiskapi, fiskaprísum, oljuprísi, dollarakursi, rentu og innlendskum og útlendskum eftirspurningi. Hesi viðurskifti kunnu virka bæði stimbrandi og tálmandi á virksemið í føroyska búskapinum, og seinastu tíðina hava tey samanlagt virka stimbrandi. Serliga er tað stóri eftirspurningurin í Føroyum, sum hevur stimbra búskaparliga virksemið nógv í seinastuni.

Vit kunnu gleðast um búskaparligu gongdina, sum hevur við sær stóran eftirspurning innlendis, og sum førir við sær arbeiði til allar hendur. Men vantandi arbeiðsmegi og ov lítið útboð av bústøðum síggjast aftur í høgum bústaðarprísum – serliga í miðstaðarøkinum. Í grannalondum okkara er trot á arbeiðsmegi í byggi- og framleiðsluvinnunum, men uppskotið hjá landsstýrinum at loyva ríkisborgarum úr ES-londum at arbeiða á føroyska arbeiðsmarknaðinum, fer væntandi at bøta um hesi viðurskifti í Føroyum.

Vandin fyri prísvøkstri er stórur. Brúkaraprístalið er vaksið 2,8% seinasta árið. Tað eru serliga vaksandi bústaðarrentur, sum hava hálað brúkaraprístalið uppeftir, meðan fallandi oljuprísir hava drigið niðureftir. Fyrsta ársfjórðing í ár vaks brúkaraprístalið 0,9%.

Búskapurin er bæði sunnur og sterkur. Føroyingar hava onga uttanlandsskuld; men viðurskifti uttanífrá kunnu ávirka stóra vøksturin í virkseminum. Toskafiskiskapurin er t.d. fyri hóttafalli, og fiskifrøðingar her heima og hjá ICES mæla eitt nú til at steðga toskafiskiskapinum í nøkur ár. Føroyski búskapurin hevði neyvan verið fyri vanlukku, um stór niðurgongd varð í toskafiskiskapinum eina tíð. Tað hevði ávirkað nøkur skip og virkir, men ikki arbeiðsloysið, tí tørvur er á arbeiðsmegi aðrastaðni í samfelagnum.

Fyri nøkrum árum síðan steðgaði næstan alt virksemi í alivinnuni innan heilt stutta tíð, tá sjúka og fallandi prísir á alifiski á heimsmarknaðinum brádliga raktu alivinnuna. Hetta kundi havt vanlukkuligar fylgir fyri føroyska búskapin, tí alifiskur var stórur partur av úflutningsvirðinum. Tó førdi skaðin í alivinnuni ikki til kreppu í samlaða búskapinum. Hetta er týðiligt tekin um sterkan og sunnan búskap, og vit kunnu nú fegnast um, at alivinnan er við at koma fyri seg aftur.

Tað setir krøv til politisku raðfestingarnar at varðveita ein sterkan og sunnan búskap. Tað hevur sjálvandi týdning, at samfelagið støðugt verður útbygt, men hetta má gerast við hóskandi ferð, sum alsamt verður lagað eftir umstøðunum. Hetta má gerast við

langtíðarløguætlanum, sum støðugt verða endurskoðaðar og lagaðar eftir virkseminum í landinum.

## Yvirskipaður fíggjarkarmur fyri land og kommunur

Arbeitt verður við at samskipa roknskaparskiparnirnar hjá kommunum og landsstýri, soleiðis at hagtøl vera fyri alt tað almenna undir einum. Hetta er stórt framstig fyri búskaparstýringina, tí við hesum fæst samlað yvirlit yvir almenna virksemið, og gjørligt verður at leggja yvirskipaðar fíggjarkarmar fyri land og kommunur

Fíggjarætlanirnar hjá kommunum eru til samans næstan líka stórar sum Løgtingsins fíggjarlóg. Veruligur búskaparpolitikkur kann tí bert førast við at hava ein felags almennan búskaparpolitikk fyri land og kommunur.

## Eftirlønir

Fyri at tryggja øllum eina sømiliga eftirløn í komandi árum, verður uppskot lagt fram um nýggja pensjónsskipan. Uppskotið byggir á tríggjar súlur:

- Samtíðarfíggjaðar skipanir: fólkapensjón og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin
- Áløgd, persónlig eftirlønaruppsparing
- Sjálvboðin, persónlig eftirlønaruppsparing

Uppskotið áleggur øllum persónum millum 16 og 67 ár at spara upp til egna eftirløn við at rinda til góðkenda eftirlønarskipan. Minstainngjaldið verður stigvíst hækkað ár fyri ár, til tað er vorðið hóskandi stórt. Samstundis verða ávísar broytingar framdar í fólkapensjónini fyri at minka um trýstið á almennu kassarnar. At enda leggur skipanin upp til, at einstaklingar kunnu fáa sær sjálvbodna eftirlønaruppsparing, um teimum tørvar tað. Samanlagt tryggjar skipanin øllum ein virðiligan aldurdóm, uttan at trýstið á almennu kassarnar økist ov nógv.

## Einskiljingar

Einskiljingarætlanirnar hjá hesi samgonguni hava gingið væl. Størsta einstaka fyritøkan á einskiljingarlistanum er Føroya Banki, sum varð skrásettur á virðisbrævamarknaðunum í juni í ár, tá ið tveir triðingar av bankanum vórðu seldir. Bankin er einskildur eftir leisti, sum Løgtingið samtykti við stórum meiriluta.

Síðan almennu Føroyar yvirtóku Føroya Banka við at skjóta 2,6 mia. kr. í bankan í 1993, hevur bankin givið landskassanum stóran vinning. Bankin hevur flutt landskassanum 1,3 mia. kr. í vinningsbýti og niðurkapitalisering, umframt at 900 mió. kr. av láninum, sum føroyski borgarin lænti frá danska statinum til bankan, eru avskrivaðar. Sølan av 66 prosentum av partabrøvunum gav 1,2 mia. kr., og virðið av síðstu 34 prosentum er leysliga mett at vera 800 mió. kr. Til samans hevur landskassin sostatt fingið umleið 4,2 mia. kr. fyri bankan – t.e. ein vinning á umleið 1,6 mia. kr.

Viðmerkjast skal tó, at rentukostnaður av skuldini, sum upprunaliga var 2,6 mia. kr., er ikki við í roknistykkinum.

Løgtingið hevur eisini samtykt, at einskiljingarinntøkur landsins ikki skulu inn í vanliga raksturin hjá landskassanum. Einskiljingarinntøkurnar skulu annaðhvørt nýtast til at gjalda skuld niður við ella setast í búskapargrunn. Í løtuni verður arbeitt við at finna breiða politiska semju um ein búskapargrunn eftir norskum leisti, har einskiljingarinntøkur og inntøkur frá eini møguligari oljuvinnu skulu setast í.

### Skatta- og avgjaldsøkið

Á skatta- og avgjaldsøkinum er komið nógv á skafti hjá hesi samgongu. Skattalógin er dagførd, soleiðis at markið fyri, nær ein rindar toppskatt, er flutt úr 185.000 upp í 270.000 kr. Hetta ger tað munandi hugaligari hjá fólki at arbeiða, tí marginalskatturin er vorðin lægri. Serliga merkist broytingin væl hjá tímaløntum, av tí at ársinntøka teirra ofta er niðan fyri nýggja toppskattamarkið. Broytingin hevur eisini stóran týdning fyri búskapin, við tað at útboðið av arbeiðsmegi vanliga økist, tá ið marginalskattatrýstið lækkar.

Nógvar broytingar og dagføringar eru eisini gjørdar í kapitalvinningsskattalógini, sum er gjørd einfaldari.

Samgongan setti sær fyri at tillaga avgjaldslógirnar, soleiðis at tær gerast betri fyri brúkaran og vinnuna. Fleiri ótíðarhóskandi punktgjøld eru longu strikað, eitt nú á elektroniskum útbúnaði og á hvítvørum. Fleiri uppskot verða løgd fram í hesi tingsetu.

Broytingar og tillagingar eru eisini gjørdar í meirvirðisgjaldslógini. Uppskot, ið hevur fyrilit fyri umhvørvinum, verður nú lagt fram í nýggjari avgjaldslóggávu fyri bilar. Hetta er fyrsta stig at laga føroyska avgjaldslóggávu til umhvørvið.

Seinni í heyst er eisini ætlanin at leggja fram lógaruppskot, har partur av vektgjaldinum verður umlagt til umhvørvisgjald.

Nýggja lógin um avgjøld fyri bilskráseting er gjørd soleiðis, at 20% av virðisgrundaða avgjaldinum verður umlagt til $CO_2$-avgjald. Hetta er sami leistur, sum ES-nevndin mælir sínum limalondum til at fremja áðrenn desember 2008, men tað eru fá lond, sum eru komin nakran veg við hesum ætlanum.

Føroyar verða tí eitt av fyrstu londunum í Evropa, ið leggja part av skrásetingargjaldinum á bilar um til $CO_2$-avgjald, soleiðis at fólk verða eggjað til at keypa bilar við lítlum $CO_2$-útláti.

Umfamt $CO_2$-avgjaldið verður burturbeiningargjaldið hækkað munandi, og stórt avgjald verður lagt á eldri lastbilar og bussar. Hesi akfør dálka mest á vegunum, og í grannalondum okkara verður stórt umhvørvisgjald lagt á tey. Soleiðis hevur ikki verið hjá okkum, og tí eru fleiri slík akfør komin til Føroya. Hesum er nú ætlanin at steðga við nýggju avgjaldslógini.

## Fiskivinnu- og sjóvinnumál

Høvuðsendamálið við fiskivinnupolitikki, lóggávu og umsiting okkara er at tryggja, at ogn føroya fólks verður varðveitt og gagnnýtt á skilabesta og sjálvberandi hátt, lívfrøðiliga og búskaparliga, til tess at tryggja besta samfelagsbúskaparliga íkastið frá fiskivinnuni. Við eini høvuðsvinnu, sum byggir á havsins tilfeingi við tess óvissum og natúrligu broytingum, vita vit, at fiskivinnupolitikkur og umsiting altíð mugu lagast til støðugt skiftandi umstøður.

Lívliga kjakið millum manna um fiskivinnuna vísir í sjálvum sær tann stóra týdning, sum hon hevur fyri samfelagið. Stórur áhugi er millum fólk at tryggja, at fiskivinnan í Føroyum hevur bjarta framtíð sum avgerandi búskapargrundarlag undir tjóð okkara. Hóast avbjóðingar og broytingar millum ár og dag kunnu vit kortini staðfesta, at vit hava eina væl virkandi skipan. Eitt sterkari samspæl er tó neyðugt millum myndugleikar, vinnu og vísindaliga ráðgeving fyri at røkka endamálinum um eina langtíðar sjálvberandi fiskivinnu.

Grundleggjandi í allari fiskidagaskipanini er fiskiorka ella veiðievni hjá fiskiførunum. Skal skipanin tæna sínum endamáli, er umráðandi at ein hevur tamarhald á hesum viðurskiftum. landsstýrismaðurin hevur gjørt av, at seta í verk eina nærri kanning, fyri at fáa skjalfest, um munandi broytingar eru farnar fram í veiðievnunum, síðani dagaskipanin varð sett í verk í

1996. Endamálið er at fáa lýst gongdini í skipanini síðani 1996, serliga við atliti at menning av tøkni og batnaðum veiðievnum og í sambandi við útskifting av fiskiførum. Úrslitini av kanningini kunnu síðani verða grundarlag undir møguligari stilling í skipanini.

Keyparar av fiskavørum á altjóða marknaðunum seta alsamt størri krøv um, at fiskavørur hava sín uppruna í burðardyggari veiðu og ábyrgdarfullari umsiting. Tað ræður eisini um hjá okkum at brúka neyðuga orku til at kunna umheimin um, hvussu okkara fiskivinna er skipað.

## Lógin um vinnuligan fiskiskap

Seint í vár viðtók Løgtingið lógarbroyting, sum staðfestir, at núverandi fiski- og veiðuloyvi vera í gildi til 31. desember 2017. Harvið er tann sonevnda 10-ára rullandi skipanin frá 1998 sett úr gildi. Verður eingin lógarbroyting framd, verða loyvini tó endurnýggjað eftir leisti, sum ítøkiliga er staðfestur í lógini og viðmerkingunum.

Greiðari reglur fyri eigarapartin hjá útlendskum feløgum í fiskivinnu okkara vórðu eisini samtyktar í vár, soleiðis at nú verður tryggjað fult samsvar millum eigarapart, nevndar-umboðan og vinningsbýti. Reglurnar viðvíkjandi mannagongdum hjá myndugleikanum at kanna feløg við útlendskum eigaraparti eru við somu lógarbroyting gjørdar greiðari.

Lóg, ið forðar fyri, at veiðuloyvi og/ella rættindi verða miðsavnað á fáum hondum, varð somuleiðis samtykt í vár.

Áður í hesum samgonguskeiði varð sonevndi "fiskapakkin" settur í gildi. Endamálið við hesum pakka var at minka um rávørunøgdina, ið fór óvirkað av landinum umframt at geva ráðfiskakeyparum í Føroyum lættari atgongd til fiskin. Lutfalsliga er minni av óvirkaðum fiski farin av landinum síðani nýggju reglurnar á økinum fóru at virka. Fiskaprísirnir eru eisini kvinkaðir rætta vegin.

Lógin um vinnuligan fiskiskap skal skapa karmar fyri avhending og flytingum av rættindum, soleiðis at vit nýta tey sum best. Samstundis er politiskt ynski um at tryggja ein fjølbroyttan flota, soleiðis at flest møgulig fiskasløg og leiðir verða gagnnýtt. Gongdin hevur tó víst, at nevndu flytingar kunnu gera, at tað legst afturat við skipum í summum bólkum og minkar almikið í øðrum. Av somu orsøk varð sonevnda "110 tons skottið" sett í lógina fyrst í hesum samgonguskeiði, umframt at skip og bátar eru við lóg flutt í teir skipabólkar har tey hoyra heima.

## Hjáveiða

Nú er álagt øllum skipum, sum fiska svartkjaft í føroyskum sjógvi, at brúka skiljirist í trolinum á ávísum leiðum til tess at sleppa undan hjáveiðu í svartkjaftafiskiskapinum, eins og hjáveiðuprosent er ásett. Økini, har loyvt verður at veiða svartkjaft, eru somuleiðis broytt, m.a. við at svartkjaftaskipini eru flutt longri út av landgrunninum. Nýggja skipanin er úrslit av góðum samstarvi millum Fiskimálaráðið, Fiskirannsóknarstovuna og vinnuna.

## Millumlandasamstarv og samráðingar um havtilfeingi

Føroyar eru einasta land, sum er strandarland fyri allar ferðandi fiskastovnar í landnyrðingspartinum av Norðuratlantshavi.

Av somu orsøk hava Føroyar í mong ár havt ein týðandi og virknan leiklut í at menna og styrkja samstarvið um fiskiskapin á hesum leiðum, bæði við samráðingum, eftirlitssamstarvi og gransking.

Fiskiskapurin eftir uppsjóvarfiski hevur stóran týdning fyri Føroyar. Svartkjaftur og makrelur eru undir skipaðum viðurskiftum við strandarlandaavtalum og samtyktum NEAFC fyri altjóða sjógv. Tíbetur er tað sama nú aftur galdandi fyri norðhavssild, eftir at strandarlondini í januar í ár samdust um avtalu fyri 2007 eftir fýra ára semingsloysi.

Enn er eftir at finna varandi semju millum strandarlondini Føroyar, Ísland og Grønland um kongafisk í Irmingarhavinum, og verða hesar samráðingar raðfestar frammarlaga. Fyribils hevur NEAFC tó samtykt heildarkvotu fyri 2007, har ein viðurkennir fyrivarnið fyri, at talan er um tveir ymsar stovnar. Fyrst og fremst er at hava fyrivarni fyri djúpvatns-stovninum, ið Føroyar eiga størri lut í.

Beinleiðis fiskiskapur eftir kongafiski í Norðurhøvum tók seg av álvara upp í 2005 við føroyskum skipum á odda. Á eykafundi í NEAFC seinasta mánað samdust limalondini um, at í 2007 skal hesin fiskiskapur verða skipaður við felags kvotu og avmarkaðari veiðutíð.

Millumlanda átøk móti ólógligari ránsveiðu av felags fiskatilfeingi okkara í Norðuratlantshavi hava minkað munandi um trupulleikan seinasta árið. Herda eftirlits-skipanin hjá NEAFC hevur tikið búskaparliga grundarlagið undan nøkrum av teimum skipum, ið NEAFC hevur svartlistað. Á árliga fundinum millum fiskimálaráðharrarnar í Norðuratlantshavi seinasta mánað í Grønlandi var semja um, at átøkini ímóti ólógligum fiskiskapi mugu halda fram og eiga at verða víðkað.

Eins og undanfarin ár hava Føroyar aftur í ár mótmælt rækjubýtinum í NAFO-øki 3L, har øll lond fáa sama lítla part, uttan mun til søguliga veiðu ella veruligan áhuga. Egin kvota varð tí aftur ásett fyri 2007, harav Føroyar hava latið Grønlandi ein part. Orsakað av mótmælinum loyvir Kanada framvegis ikki fiskiskipum okkara í havnir sínar. Einvegis tiltøkini hjá Kanada forða framvegis NAFO í at greiða málið.

Fiskiskapur eftir rossamakreli í Suðurkyrrahavi hevur tikið seg upp í altjóða sjógvi seinastu árini, og føroysk skip royna nú eisini á leiðini. Av serligum orsøkum hava fyrstu royndirnar verið óvanliga torførar, og hetta harmast øll um, men tað er okkara vón, at ætlanirnar við tíðini fara at eydnast og mennast.

Føroyar eru við í samráðingunum um at gera nýggjan millumlandasáttmála um, hvussu best er at umsita fiskiveiðuna í økinum.

## Sínámillum fiskiveiðusamstarv

Avtalurnar um sínámillum fiskiskap hava sum heild verið støðugar. Í teimum førum, har støðan í fiskastovnunum er munandi broytt, hevur hetta kortini ávirkað samráðingarnar og samráðingarúrslitið.

Føroyar hava fyri 2007 gjørt avtalur við Ísland, Grønland, Noreg, Russland og ES á nøkulunda sama stigi sum undanfarin ár.

Harumframt hava Føroyar, Noreg, Ísland og ES gjørt avtalu um at kunna fiska partar av strandarlandakvotum sínum av svartkjafti, norðhavssild og makreli inni hjá hvør øðrum.

Seinastu árini hava serliga viðurskiftini hjá ídnaðarskipunum verið torfør, tí stovnarnir av nebbasild og hvítingsbróður í ES-sjógvi og norskum sjógvi hava verið og eru sera illa fyri. Hetta hevur gjørt, at fiskimøguleikarnir hjá ídnaðarskipunum hava verið nógv skerdir. Tí varð tað hildið at vera framstig, at tað í 2007 eydnaðist at fáa hesum skipum nebbasildakvotu í ES-sjógvi – tó at hon ikki var so stór, sum hon onkuntíð hevur verið.

Russiska svartkjaftakvotan í føroyskum sjógvi minkaði 20.000 tons, uttan at botnfiska-kvotan hjá føroyskum skipum í Barentshavinum varð broytt. Tá ið samanum kemur hevur

hetta bøtt um møguleikarnar hjá føroyskum svartkjaftaskipum, nú svartkjaftakvotan er vorðin avmarkað.

Torførastu fiskiveiðusamráðingarnar fyri 2007 vóru við Ísland. Føroyar hava undir samráðingunum seinastu árini gjørt vart við, at íslendska kravið um, at føroysk skip ikki kunnu avreiða lodnu undan Íslandi til matna í Føroyum ella virka hana á føroyskum skipum, er ógrundað, og at Føroyar síggja hetta sum eina handilsforðing. Nú Hoyvíkssáttmálin er komin í gildi, vístu Føroyar á, at íslendingar eiga at strika hesa forðing. Eftir tógvið stríð eydnaðist at finna eina loysn, sum partvíst gongur føroyska kravinum á møti, men enn er tó ikki komið á mál. Ásetingin um forðingar fyri, hvussu sínámillum kvotur verða hagreiddar, er eftir føroyskum tykki ikki í samsvari við Hoyvíkssáttmálan og eigur at verða strikað.

## Hvalaveiðumál

Samstarvið í NAMMCO (Norðuratlantisku nevndini fyri samstarv um havsúgdýr) er virkið á fleiri økjum, ikki minst í granskingarhøpi. Vísindanevndin hjá NAMMCO hevur samskipað umfatandi hvalateljing tvørtur um Norðuratlantshav í summar, og føroyskt skip er við í hesum arbeiði. Úrslitini av teljingunum kunnu m.a. geva grundarlag fyri at dagføra stovnsmetingina av grindahvali á okkara leiðum.

Á ársfundinum hjá IWC (Altjóða hvalaveiðunevndini) í fjør samtykti ein lítil meiriluti av limalondunum, teirra millum Danmark, at bannið móti vinnuligari stórhvalaveiðu frá 1982 eigur at verða avtikið. Meirilutin var tó stokkutur, tí longu á ársfundinum í Alaska í mai mánaði í ár var hann burtur, og helst er ógjørligt at fáa IWC at vera umsitingarstovn fyri stórhval aftur. Føroyar hava brúkt rættiliga stóra orku seinastu árini at arbeiða fyri eini loysn, men sum støðan er, er lítil meining í at halda áfram við hesum. Vit eiga heldur at menna og styrkja samstarvið í NAMMCO enn meira og at brúka okkara millumlanda felagsskap í Norðuratlantshavi til eisini at samstarva um umsiting av stórhvali.

## Gransking og menning

Við tí leikluti, sum fiskivinnan hevur og fer at hava í føroyska samfelagnum, er miðvís gransking og menning á sjógvi og á landi sjálvsagdur lutur.

Stórur dentur verður tí lagdur á at styrkja og menna gransking. Tríggir granskingarkjarnar eru stovnssettir í trimum ymiskum yrkisgreinum – veiðutøkni, framleiðslutøkni og biotøkni. Henda skipan er við til at menna føroyska fiskivinnugransking ástøðiliga og granskingarumhvørvið sum heild, sum er fortreyt fyri at styrkja um kappingarføri og førleikar okkara at troyta nýggjar møguleikar.

Vitan og yrkisførleiki verða framhaldandi raðfest við játtanum til gransking og menning á fiskivinnuøkinum.

## Tilbúgving

Málsøkið tilbúgving varð yvirtikið á nýggjárinum, og samstundis varð kongliga fyriskipanin um sivilverju frá fyrst í fimmtiárinum sett úr gildi. Í staðin eru reglur um tilbúgving skipaðar í brunalógina. Grundreglan er "økisábyrgd," ið merkir, at tann, sum umsitur eitthvørt málsøki, eisini varðar av tilbúgvingini á økinum. Tryggjast skal, at virkisførið í samfelagnum verður skert minst møguligt, um vanlukkur henda. Verandi lógarásetingar skulu avloysast av eini meiri varandi tilbúgvingarlóggávu áðrenn árslok 2008.

Sjøtul er settur á arbeiðið at skipa eina kjarnorkutilbúgving. Væntandi fer arbeiðið at taka umleið trý ár.

Eitt annað týðandi mál er at skapa góðar karmar fyri sjálvbodnu bjargingarfeløgini kring landið.

Tilbúgvingarstovnur Føroya hevur gjørt stórar íløgur í nýggja neyð- og trygdarútgerð, og farið er m.a. undir at betra um VHF-útbreiðsluna millum oyggjarnar. Fýra VHF-støðir eru útskiftar, og fýra verða uppsettar afturat. Harumframt verður uppsett ein AIS-skipan við átta grundstøðum á somu plássum sum VHF-støðirnar. AIS, ið stendur fyri Automatic Identification System, er skipan, ið veitir støðugar upplýsingar um skipaferðsluna í VHF-økinum. Skipanin kann eisini nýtast til at senda skipum ávaringar og onnur boð, umframt til at hava eftirlit við eitt nú boyum og vitum. Samanlagt eru íløgur gjørdar fyri umleið 21 milliónir krónur fyri at betra um trygdina á sjónum.

Í heyst fekk MRCC Tórshavn sum fyrsti almenni myndugleiki ISO 9000-góðkenning.

## Skipaeftirlit

Í vár fekk Skipaeftirlitið ISO 9000 góðkenning. Næsta stig er, at altjóða sjóferðslustovnurin hjá ST, IMO, skal góðskuskoða Skipaeftirlitið sambært altjóða ásettum standardum fyri sjóvinnufyrisitingar. Fyribils er avtalað, at skoðanin verður á heysti 2008. ISO 9000 er stig á hesi leið.

## Føroya Altjóða Skipaskráseting (FAS)

Síðan FAS-álitið var handað landsstýrismanninum á vári 2006, eru nakrar av tilmæltu broytingunum í skattalóggávuni framdar. Skipaeftirlitið hevur harumframt fingið játtaðar kr. 800.000 at menna FAS fyri. Í løtuni eru 38 skip í skipanini. Ætlanin er at menna Føroya Altjóða Skipaskráseting (FAS) soleiðis, at henda vinnugrein og virksemi hon skapar, kann gerast eitt íkast í føroyska búskapin.

# Vinnumál

## Vinnulóggáva og vinnupolitkkur

Gongdin í skjótt farna valskeiði vísir, at vinnupolitikkurin hevur hepnast. Virksemið er stórt, arbeiðsloysið er metlágt, og útbyggingarnar av samfelagnum styrkja alsamt fjølbroyttari vinnumøguleikum. Yvirhøvur hava fyritøkurnar sunnan rakstur við rímiligum forrentningi av eginpeninginum saman við avmarkaðari skuldarbyrðu.

Fleiri av grundleggjandi vinnulógunum eru endurskoðaðar eftir tí stevnumiði, at tær skulu vera á altjóða stigi Ætlanin er, at í framtíðini skulu hesar lógir verða dagførdar javnan, soleiðis at tær áhaldandi eru í samsvari við lóggávuna aðrastaðni. Í farnu tingsetu samtykti Løgtingið nýggjar vinnulóggávur og nýggja kappingarlóg. Allar hesar eru í samsvari við nýggjastu, altjóða lóggávur.

Ætlanin er nú at leggja uppskot um marknaðarføringslóg fyri Løgtingið til tess at áseta minstukrøv um marknaðaratferð hjá vinnufyritøkum.

Landsstýrið er samt um at yvirtaka alt vinnulógarøkið frá 1. januar 2008. Í tí sambandi hava landsstýrismaðurin í vinnumálum og danski vinnumálaráðharrin 29. juni 2007 gjørt felagsyvirlýsing um samstarv í sambandi við yvirtøkurnar av málsøkinum.

Yvirskipaða endamálið við nútíðar vinnulógum og dagførda vinnupolitikkinum er at gera føroyska búskapin sjálvberandi, so at vit trygt kunnu leggja støðið undir framhaldandi yvirtøkur eftir yvirtøkulógini, har fíggjarligt rásarúm ger tað møguligt at raðfesta sambært politiskum semjum.

## Aling

Dentur fer framvegis at verða lagdur á at dagføra reglurnar um rakstur, sjúkufyribyrging og niðurberjing, umframt at dagføra eftirlitið, tí vandi er altíð fyri, at nýggjar sum gamlar sjúkur kunnu stinga seg upp. Tá tað snýr seg um nýggj fiskasløg verður serligur dentur lagdur á menna toskaaling, og verða vinnuligar royndir gjørdar í Hvalba og Árnafirði

Farið er undir at endurskoða alilógina, m.a. so at tey dugnaligastu fara at sita við aliloyvunum í framtíðini, og so at aliloyvir ikki skulu liggja ónýtt. Málið í endurskoðanar-arbeiðinum er eisini at dagføra karmarnar við atliti at vinnuligu og tøkniligu menningini á økinum. Ætlandi verður uppskot til broytingar í alilógini lagt fyri Løgtingið í hesi tingsetu.

## Landbúnaður

Løgtingið samtykti í mai í ár nýggja lóg um landsjørð. Vinnuligu viðurskiftini hjá festarunum kunnu við nýggju lógini javnsetast við viðurskiftini hjá øðrum vinnurekandi. Ætlanin er, at Royndarstøðin skal gerast virknari innan tænastur og gransking í sínum samstarvi við vinnuna, og somuleiðis eigur í framtíðini størri dentur at vera lagdur á granskingarsamstarv við innlendskar og útlendskar granskingarstovnar, so at ymsu landbúnaðargreinirnar kunnu mennast betur.

Farnu árini hevur verið arbeitt miðvíst við at fáa avtalu við ES um innflutning av rossum úr Íslandi. Hesi viðurskifti eru nú komin undir land, og í heyst verður gjørligt at flyta inn ross beinleiðis úr Íslandi.

## Trygging

Tryggingarmarknaðurin í Føroyum er ikki frælsur, tí sum meginregla er ikki loyvt føroyingum at tekna tryggingar uttanlands, og útlendsk feløg kunnu ikki fáa loyvi at reka tryggingarvirksemi í Føroyum. Føroysku tryggingarfeløgini hava eisini avmarkaðar møgu-leikar at fáa atgongd til at reka tryggingarvirksemi uttanlands, eitt nú í ES/EBS-londum. Hesar avmarkingar eru tó ikki galdandi í viðurskiftunum millum Føroyar og Ísland.

Nærum øll tann føroyska eftirlønaruppsparingin verður sett í útlendsk virðisbrøv, m.a. orsakað av lógarkravinum um, at pensjónsuppsparing skal setast í virðisbrøv, sum eru skrásett á virðisbrævamarknaði. Hetta forðar fyri, at peningur kann verða settur í føroysk aktiv.

Dagførd altjóða tryggingarlógáva verður løgd fyri Løgtingið í næstum.

## Vinnugransking

Arbeitt hevur verið við at staðseta nýggja granskingarlund í Nóatúni/Debesartrøð. Fyrireikingarnar halda áfram, og uppskot verður lagt fyri Løgtingið um heimild at stovna partafelag, sum skal reka granskingarlundina. Ætlanin er at játta pening til trý professaraembæti í ávikavist mannaílegutøkni, djóraílegutøkni og ídnaðarligari biotøkni. Hetta verður gjørt fyri at tryggja, at gongd kann koma á granskingina, og at hon verður á altjóða stigi. Professaraembætini skulu vera tíðaravmarkað til fimm ár.

Yvirskipaða málið við granskingarlundini er m.a.:

- at handilsgera granskingar- og kanningarúrslit
- at fremja nýskapan í fyritøkum, at menna nýggjar fyritøkur og at fáa fyritøkur til Føroya
- at menna sambond og samstarv millum gransking og vinnu

## Vinnuframi

Menningarstovan og Ferðaráðið eru nú løgd saman í ein stovn - Samvit. Stovnurin er farin undir at fremja ætlanirnar við m.a. at marknaðarføra og menna Føroyar sum ferðamannaland, at menna ein íverksetarahugburð í Føroyum og at skapa karmar fyri hesum. Samvit er virkin partur av verkætlanini hjá almennu Føroyum um tjóðarbranding Føroya og samstarvar við íverksetaradepilin í Klaksvík.

## Samferðsluætlan

Samferðslukervið hevur stóra ávirkan á, hvussu samfelagið virkar. Visjónin fyri samferðslukervið í Føroyum er: Góðir ferðamøguleikar skulu stuðla upp undir og tryggja menning og trivnað í Føroyum. Infrakervið skal vera soleiðis háttað, at lætt, trygt og ódýrt er hjá øllum at ferðast – bæði innanoyggja og út í heim.

Ítøkilig mál eru sett fyri at fáa eitt skjótt, smidligt og dygdargott flutningskervi, har nullhugsjónin er grundarlagið undir øllum ferðslutrygdararbeiði. Sum nakað nýtt verður dentur eisini lagdur á ferðafólkaleiðir, gongugøtur og súkklugøtur.

Út á summarið verður tunnilin millum Øravík og Hov tikin í nýtslu. Teir tunlar, sum síðan eru mest átrokandi at gera eru tunnilin Norður um Fjall, til Viðareiðis og nýggjur tunnil til Hvalbiar. Eisini smærri tunlar skulu raðfestast. Landsverk hevur saman við Vinnumálaráðnum gjørt gjølliga lýsing av ferðslukervinum, og henda lýsing er dygt grundarlag undir komandi politiskum raðfestingum. Av størri ætlanum innan samferðslukervið kunnu m.a. nevnast leinging av flogvøllinum og undirsjóvartunlar millum Skálafjørðin og Havnina og millum Streymoynna og Sandoynna.

## Nýggj havnalóg

Stórur tørvur er á at dagføra lógarkarmarnar um havnavirksemið, tí verandi reglur á økinum eru bæði ófullfíggjaðar og ótíðarhóskandi. Bæði myndugleikar og havnaeigarar hava víst á tørvin á nýggjari havnalóg, sum greiðari ásetur myndugleikauppgávur og reglur annars, m.a. um havnamørk og redmørk, rakstrarformar o.a. Uppskot til løgtingslóg um havnir, har nevndi tørvur er týðandi partur av uppskotinum, er nú orðað og verður lagt fyri Løgtingið í hesi tingsetu.

## KT-nýtsla

Visjónin er, at nýtslan av kunningar- og samskiftistøkni hjá tí almenna, í skúlaverkinum og í vinnuni skal vera við til at lyfta føroyska samfelagið frá ídnaðarsamfelagi til nýskapanarsamfelag. Hetta fer at hava við sær, at øll tann føroyska vinnan (eisini KT-vinnan) kann gera seg galdandi á altjóða palli.

Fjarskiftis- og KT-marknaðurin er í støðugari menning, og serliga fer fram ein konsolidering av verandi fyritøkum, umframt fyritøkurnar gera og hava ætlanir um stórar

íløgur í altjóða virksemi. Somuleiðis eru mál orðað um KT-undirstøðukervið og um KT í skúlum, vinnulívi og hjá tí almenna, og arbeitt verður áhaldandi við at røkka hesum málum.

Á fjarskiftisøkinum er serliga talan um at leggja nýggjan kaðal millum Føroyar og Skotland um Hetland. Á KT-økinum er talan um at keypa útlendskar KT-fyritøkur, m.a. við tí í hyggju at leggja støði undir útflutning av føroyskum KT-skipanum. Henda gongdin kann vera við til at menna virksemið hjá føroyskum fyritøkum uttanlands yvirhøvur.

Vinnumálaráðið er farið at kanna, um altjóða áhugi er at nýta útbúnaðin og økið á Sornfelli at hýsa framtíðar backupskipanum. Við nógva yvirganginum og vaksandi tørvinum á tryggum housingskipanum um allan heim, eru óivað góðir møguleikar hjá okkum at menna skipanir, sum hava altjóða áhuga.

## Ferðslutrygd

Ferðslulógin er broytt, so at fremsta málið nú er, at eingin skal doyggja ella fáa álvarsligt mein av ferðsluvanlukku. Tað er staðfest, at ungir bilførarar hava verið við í meira enn helvtini av teimum ferðsluóhappum, har fólkaskaði hevur verið. Tí eru fleiri ítøkilig tiltøk framd í farnu tingsetu at steðga hesi gongd, m.a. við broytingum í ferðslulógini, serliga viðvíkjandi ungum bilførarum. Eitt av málunum í Visjón 2015 er at gera eina ferðslutrygdarætlan. Hetta arbeiði er sett í gongd í felags átaki við aðrar áhugapartar á ferðslutrygdarøkinum.

## Flogferðsla

Flogvinnan gerst eitt alsamt týdningarmeiri íkast í føroyska búskapinum, eins og flúgving til og úr Føroyum er umráðandi fortreyt fyri samskiftismøguleikunum hjá virkjum og einstaklingum. Ætlanin er framhaldandi at betra um karmarnar fyri flogferðslu. Hetta verður gjørt við at byggja út Vága Floghavn og framhaldandi at kanna møguleikarnar fyri aðrari floghavn í Føroyum. Væntandi verða kanningarúrslitini tøk í 2011 ella 2012, og tá ber til at taka endaliga politiska avgerð um annan flogvøll.

Harumframt er ætlanin at dagføra karmarnar í flogferðslulógini, og uppskot til ríkislógartilmæli verður væntandi lagt fyri Løgtingið í heyst. Henda dagføring er m.a. ein týðandi fortreyt fyri ætlanunum hjá landsstýrinum at gerast partur av evropeiska flogferðslumarknaðinum.

Í august verða samráðingar millum landsstýrismannin í vinnumálum og danska samferðsluráðharran um mannagongdir í sambandi við yvirtøku av loftferðslumyndugleikanum. Ætlandi verður úrslitið av samráðingunum, at partarnir semjast um at lýsa økið til fulnar, so at tað verður greitt til avgerð um yvirtøkuleist. Loftferðslumyndugleikin er fyri stóran part skipaður eftir altjóða ásetingum. Við loftferðslumyndugleikanum fylgir við vaksandi tal av førleikakrevjandi størvum.

## Olja og orka

Aðalorðaskifti hevur verið um uppskot til orkupolitikk, og nýggj elveitingarlóg varð samtykt í síðstu tingsetu. Yvirskipaðu málini við nýggja orkupolitikkinum eru, at innan 2015 skulu 20% av orkunýtsluni á landi stava frá varandi orku, og fiskiflotin skal nýta 15% minni orku í mun til veiðunøgdina. Føroyar eru nógv bundnar at innfluttari olju, við tað at umleið 95% av okkara orkutørvi verður nøktaður við olju. Skulu vit broyta hetta, mugu vit nýta nógv meira av varandi orkukeldum og gagnnýta orkutilfeingið betur, millum annað við at

seta krøv um skynsama orkunýtslu, tá ið farið verður at byggja og umvæla hús og bygningar.

Tær kanningar, sum higartil eru gjørdar í sambandi við Nólsoyarverkætlanina, benda á, at Nólsoyggin er sera væl egnað til eina størri royndarverkætlan, sum skal skapa eina sjálvberandi og óhefta orkuskipan, har øll orkunýtslan í oynni stavar frá varandi orkukeldum.

Útlendsk orkufeløg gjørdu í vár av at gerast partur av einum verkætlanarbólki saman við okkara myndugleikum. Endamálið er at kanna, hvussu vit við vindorku, vetni og nýggjari tøkni kunnu røkka málunum um eitt sjálvberandi samfelag.

Onnur stig eru eisini tikin á orkuøkinum. Sum dømi kunnu nevnast føroysk-íslendski arbeiðsbólkurin, ið kannar møguleikarnar at leggja elkaðal millum Ísland og Føroyar. Harumframt arbeiðir Sewave, sum SEV eigur saman við skotskum felag, við verkætlan sum kann gagnnýta alduorku til vinnuliga streymframleiðslu. Vinnumálaráðið hevur fingið umsókn um at stuðla ætlanini.

Seinni í heyst verður farið at bora sætta leitibrunnin á landgrunni okkara, og avtala er eisini gjørd um sjeyndu leitiboringina, ið skal borast næstu tvey árini. Fyrireikingarnar til triðja útbjóðingarumfar á landgrunninum eru byrjaðar, og eftir ætlan verður klárt at bjóða út seinni í heyst. Enn er ov tíðliga at siga nakað um áhugan fyri triðja útbjóðingarumfarinum, men grundað á virksemið, sum er avtalað á føroyska økinum, og grundað á boringarnar bretskumegin markið halda vit, at vaksandi áhugi er fyri økinum vestan fyri Hetland og tískil eisini fyri føroyska landgrunninum.

## Arbeiðsskaðatrygging

Nýggj lóg um trygging móti avleiðingum av arbeiðsskaða, (arbeiðsskaðatryggingarlógin), verður løgd fyri tingið í heyst og kemur í staðin fyri vanlukkutryggingarlógina. Við hesum verður lóggávan dagførd í samsvari við líknandi lóggávu í øðrum Norðurlondum. Nýggja uppskotið veitir munandi betri sømdir enn higartil, m.a. verða fleiri mein og sjúkur nú viðurkend sum arbeiðsskaðar, og størri upphæddirnar verða eisini veittar í endurgjaldi og samsýning.

## Arbeiðsmarknaðarkommissión

Føroyski arbeiðsmarknaðurin broytist alsamt, og nýggir lívshættir eru komnir, har fólk setir krøv til ein smidligari arbeiðsmarknað, so at lættari er at sameina arbeiðslív og familjulív.

Ávís tiltøk eiga tí at verða sett í verk til tess at brynja føroyska samfelagið til komandi avbjóðingar á arbeiðsmarknaðinum. Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur tískil avgjørt at seta eina kommissión at viðgera hesi viðurskifti. Málið er, at fólk skulu hava eitt gott familjulív, soleiðis at tey eisini kunnu vera virkin og væl fyri á arbeiðsmarknaðinum. Málið er at røkka einum góðum og mennandi familjulívi, soleiðis at arbeiðsmarknaðurin sum úrslit av hesum fær væl motiveraðar og innovativar løntakarar.

Talan verður um sera umfatandi arbeiðið, og tí er týdningarmikið at nóg mikið av tíð verður sett av til hetta endamál. Kommissiónin skal tískil eftir ætlan verða liðugt 1. januar 2009. Byrjað verður við einum almennum seminari í september.

### Einskiljingar

Fyrireikingarnar til at einskilja 33% av P/F Atlantsflogi eru komnar væl áleiðis, og sølan byrjar væntandi í september.

Fyrireikingar eru eisini gjørdar til at einskilja 50% av LÍV og at avhenda 50% av partapeninginum til ognarfelagið LÍV, ið umboðar tryggingartakararnar. Ráðgevarnir leggja í løtuni síðstu hond á virðismetingar av felagnum. Í hesum sambandi hava ráðgevarnir gjørt vart við, at tað er avgerandi fyri virðið á felagnum at gera ein partaeigarasáttmála við Ognarfelagið LÍV, so at ein m.a. tryggjar sær, at felagið ikki endar í atgerðarloysi. Enn er ikki komið á mál við slíkari avtalu. Væntandi byrjar sølan stutt eftir, at nevndi partaeigarasáttmáli er gjørdur.

## Mentan, undirvísing og gransking

### Fólkaskúlin

Í kjalarvørrinum av PISA-undankanningini stóðst mikið orðaskifti um vantandi førleika hjá føroyskum skúlanæmingum í lesing, náttúrulærugreinum og støddfrøði. Hetta varð tikið í størsta álvara, og arbeiðsbólkur varð settur at greina úrslitið og at koma við tilmæli um átøk til tess at bøta um støðuna.

Aðalorðaskifti var á tingi um møguligar broytingar í fólkaskúlalógini. Tingfólk vóru samd um, at neyðugt var at styrkja fleiri tættir í undirvísing fólkaskúlans, og í vár vórðu týðandi broytingar í fólkaskúlalógini samtyktar og fígging fingin til vegar. Síðan hevur verið arbeitt miðvíst við at seta broytingarnar í verk:

- Tímatalið í byrjanarundirvísingini er økt munandi, so at tað samsvarar við tímatalið hjá næmingum í hinum Norðurlondunum. Skúlaárið 2007/08 fáa 1. og 2. flokkur tríggjar vikutímar afturat, og 3. flokkur fær tveir. Skúlaárið 2008/09 verður tímatalið hjá hesum flokkum økt við sama tímatali. Sostatt verður økt um tímatalið í byrjanarundirvísingini við til samans 16 vikutímum næstu tvey skúlaárini
- Lesiráðgevi er settur í starv á Føroya Læraraskúla til tess at menna kunnleikan um lesing, bæði hjá læraraskúlanæmingum og lærarum fólkaskúlans. Hetta er nýskipað starv, sum fatar um bæði undirvísing og gransking, og hetta er fyrsta stig at seta í verk námsfrøðiliga gransking í Føroyum
- Sambært broyting í fólkaskúlalógini í juni í ár er heimild eisini fingin til vegar at seta í verk námsfrøðiliga gransking. Fyrsta granskingarverkætlan er longu góðkend og sett í verk og verður fyriskipað av Føroya Læraraskúla/Fróðskaparsetrinum. Verkætlanin hevur til endamáls at kanna lesiførleikan hjá næmingum í 1. – 3. flokki og ávirkanina, ið økta tímatalið hevur á lesimenningina
- Játtanin til at gera tíðarhóskandi undirvísingartilfar til allar lærugreinir fólkaskúlans er hækkað, og Skúlabókagrunnurin er farin í holt við at gera tilfar til byrjanarundirvísingina

Harumframt verður arbeitt við:

- at dagføra og styrkja eftirmetingina í fólkaskúlanum við m. a. at seta í verk landsroyndir í føroyskum, støddfrøði og náttúrulærugreinunum í 4. og 6. flokki, støðuroyndir í ávísum lærugreinum í 3., 5 og 7. flokki, og støðuroyndir í lesing og støddfrøði í 1. og 2. flokki. Landsroyndir og støðuroyndirnar eru amboð hjá skúlunum at eftirmeta undirvísingina, og eigur úrslitið at verða nýtt bæði til at leggja undirvísingina til rættis frameftir, sum kunning til foreldur um fakligu støðu

næminganna, og sum støði hjá skúla og heimi í felag at menna sjálvsvirði, arbeiðslag og úrtøku næmingsins í undirvísingini

- at seta lesiætlanarnevnd at gera felags lesiætlanir fyri alt landið í øllum lærugreinum. Í lesiætlanunum skulu verða sett ávegismál og endalig mál, so skúlin kann meta um, hvørt næmingarnir hava nátt ætlaðum málum í undirvísingini. Lesiætlanirnar skulu verða samskipaðar við lesiætlanirnar í miðnámsskúlunum. Nýggjur próvtalsstigi verður settur í verk 1. august 2008
- at skipa øðrvísi undirvísingartilboð til næmingar, ið hava atferðar-, tilknýtis- og trivnaðartrupulleikar, og sum ikki kunnu fáa nøktandi undirvísing í fólkaskúlanum. Næmingarnir eiga ikki varandi at verða fluttir í annað undirvísingartilboð, men endamálið er at geva næmingunum íblástur og at menna teirra sosiala og fakliga førleika í eitt tíðarskeið frá trimum mánaðum til tvey ár, so teir aftur kunnu gerast førir fyri at fylgja undirvísingini í flokkinum

PISA-kanningin, ið varð gjørd í 2006, verður almannakunngjørd fyrst í desember í ár. Tey átøk, sum nú eru og verða sett í verk, fara tó ikki at síggjast aftur fyrr enn í PISA-kanningini, sum verður í 2009.

## Sernámsfrøðiligar tænastueindir

Í arbeiðinum at umskipa og betra sernámsfrøðiligu tænastuna skipar Mentamálaráðið í samstarvi við kommunurnar *NSR-tænastur* kring landið. Fyrsta tænastueindin, sum var sett á stovn í Eysturoynni, fór til verka í junimánaði í 2006, og sambært afturmeldingum er hetta skipan, sum skúli, foreldur og lokalir myndugleikar eru væl nøgd við. Eftir ætlan verða tvær tænastueindir skipaðar afturat í 2007, ein í Suðuroy og ein í Havn. Tænastueindin í Suðuroy fer væntandi til verka í august, og tann í Havn verður klár eina ferð seinni í heyst. Arbeitt verður við at fáa játtan á fíggjarlógini í 2008 til at skipa NSR-tænastueindir aðrastaðni í landinum.

## Stuðlar í fólkaskúlanum

1. januar 2007 gjørdist alt økið, sum umfatar stuðul til børn í skúlatíð, heruppi í persónligur stuðul, ábyrgdarøki hjá Mentamálaráðnum, og samstundis varð játtanin til sernámsfrøðiligt virksemi í fólkaskúlanum hækkað. Við hesi skipan eru umstøðurnar at nøkta tann persónliga stuðul, sum ávísir næmingar í fólkaskúlanum hava tørv á, vorðnar munandi betri, tí nú er tað ein og sami myndugleiki, sum umsitur økið. Hetta gevur eisini betri umstøður til annan sernámsfrøðiligan stuðul, sum frammanundan hevur verið alt ov lítil, av tí at partur av játtanini til hetta endamál hevur verið nýttur til at fíggja persónligar stuðlar.

## Undirvísingarportalur

Í oktober 2006 varð samstarvsavtala gjørd millum Mentamálaráðið og kommunurnar um at skipa og reka ein undirvísingarportal á internetinum. Á portalinum, sum Skúlabókagrunnurin hevur undir hond, fer at bera til hjá øllum at finna m.a. bókaskráir, sum lýsa tær útgávur, sum Skúlabókagrunnurin hevur staðið fyri, undirvísingartilfar, bæði sum tekst og í talgildum formi, og annað kunnandi tilfar. Portalurin er umframt hetta ein samskiftis- og tíðindatænasta.

## Frískúli

Landsstýrismaðurin hevur játtað, at frá 1. august 2007 verður nýggjur frískúli settur á stovn í Tórshavnar kommunu. Sambært løgtingslóg kunnu áhugað søkja um loyvi at seta á stovn frískúla innan teir karmar, sum eru ásettir í lógini. Áhugabólkur hevur søkt um góðkenning, og ætla umsøkjararnir at fara undir frískúlavirksemi skúlaárið 2007/08 við næmingum í 1. og 2. flokki. Síðan er ætlanin at taka ein nýggjan flokk upp hvørt skúlaár, til skúlin hevur næmingar í 1. – 7. skúlaári.

## SSP

Føroya landfúti hevur í samstarvi við landsstýrismenninar í mentamálum og almanna- og heilsumálum tikið stig til at seta á stovn SSP-skipan í skúlunum. SSP er eitt skipað samstarv millum skúlaverk, sosialar myndugleikar og politi, ið øll hava serliga ábyrgd fyri trivnaði og uppvøkstri hjá børnum og ungum. Endamálið er at fyribyrgja kriminaliteti millum børn og ung.

## Miðnámsútbúgvingar

Tað hevur stóran týdning at nútímansgera miðnámsútbúgvingarnar og samstundis at skapa so góðar karmar um tær, at allir føroyingar kunnu fáa útbúgving eftir loknan fólkaskúla.

Nevndin, ið arbeiðir við at gera nýggja skipan fyri gymnasialu útbúgvingarnar, fer at handa landsstýrismanninum álit seinast í august í ár, og síðan verður aðalorðaskifti í Løgtinginum. Seinni í heyst er ætlanin at leggja lógaruppskot fyri tingið. Endamálið við hesi dagføringar- og menningartilgongd er at fáa størri samstarv millum útbúgvingarnar og at fáa eina liðiliga skipan, ið er lagað til okkara tørv, samstundis sum útbúgvingarnar eru góðkendar í teimum londum, har ungdómur okkara fer undir hægri lestur. Eins og í fólkaskúlanum verður nýggjur próvtalsstigi settur í verk við skúlaársbyrjan 2008.

Seinast í hesum ári verður farið undir tilgongd at dagføra og menna yrkisútbúgvingarnar. Avvarðandi partar, t.e. vinnan, yrkisskúlarnir og myndugleikin, eru samdir um at fara undir hetta arbeiði. Stórur tørvur er á útbúnum fólki í matvøruyrkinum, eitt nú at matgera á stovnum og matstovum. Arbeitt verður við at kanna møguleikarnar fyri at seta á stovn yrkisútbúgvingar á hesum øki, og í umbúna er eisini at lýsa tørvin á útbúgvingum í ferðavinnuni.

Tørvurin á útbúnum starvsfólki á eldraøkinum veksur, og tí hevur landsstýrið sett á stovn heilsurøktaraútbúgving, ið byggir á heilsuhjálparaútbúgvingina.

## Skúlabygging

Í hesum valskeiði er skúlabygging raðfest frammarlaga, og úrslitið er, at fleiri miðnáms-skúlar verða bygdir eftir ein átrokandi tørv í áratíggjur. Samtykt er at byggja nýggjan miðnámsskúla við Marknagil, har Tekniski Skúli og Føroya Handilsskúli fara at húsast. Útbyggingin av Tekniska Skúla í Klaksvík skuldi eftir ætlan verða liðug á sumri 2008, men verður nú longu liðug seinast í hesum árinum. Skúladepilin í Suðuroy verður klárur at taka í nýtslu á sumri 2008, og Fiskivinnuskúlin í Vestmanna verður liðugur í januar 2009.

Í løtuni verður kannað, hvussu ein á besta hátt kann savna virksemið hjá Vinnuháskúlanum á einum stað, og síðan er ætlanin at seta bygginevnd.

Eingin endalig loysn er enn funnin á hølisviðurskiftunum hjá Føroya Studentaskúla og HF-skeiði, hóast ábøtur eru og verða gjørdar. Eldsbrunin í juni í ár hevur gjørt tað enn meira

átrokandi at finna eina varandi loysn. Seinni í ár verður skipað fyri óheftari kanning av bygningarligu- og námsfrøðiligu viðurskiftunum. Kanningin skal geva landsstýrismanninum haldgott grundarlag at taka støða á.

Hugaligt er at síggja, at nógvar kommunur eru farnar at nútímansgera sínar skúlabygningar. Umráðandi er at hava góðar karmar um fólkaskúlan til tess at skapa trivnað, fakligar avbjóðingar, nýskapan og fjølbroytta undirvísing. Skal støðið undir arbeiðinum vera nóg gott, er neyðugt við góðum samstarvi millum Mentamálaráðið og kommunurnar.

## Hægri lestur

Fyri at tryggja, at útbúnir skipsførarar og maskinmeistarar kunnu halda beinleiðis fram við kandidatútbúgving, er ætlanin at skipa útbúgvingarnar á bachelorstigi. Dagføringar- og menningartilgongdin í hesum sambandi heldur fram, og vinnan hevur viðgjørt spurningin við vælvild. Longu í august í ár verður sjøtul settur á at førleikamenna lærarar skúlans, og eftir ætlan fer skúlin at taka lesandi inn til nýggju útbúgvingina í 2009.

Í 2003 varð Sjúkrarøktarfrøðiskúlin lyftur upp á bachelorstig, og fyrstu bachelorarnir vóru lidnir í ár. Arbeitt verður í løtuni við lærara- og pedagútbúgvingunum, og ætlanin er at leggja uppskot fyri tingið í hesi tingsetu.

Arbeiðið við at samskipa allar hægri útbúgvingar er komið væl áleiðis, og uppskot til løgtingslóg um Lærda Háskúla Føroya verður lagt fyri Løgtingið í næstum. Lærdi Háskúli Føroya fer at verða týdningarmikil vitanardepil í samfelagnum og skal vera við til at tryggja gransking, menning og nýskapan bestu kor.

## Gransking og ES-samstarv

Til tess at menna føroyska gransking og skipa samanhangandi bygnað millum politikk, útinning og umsiting, verða Vísindaráðið og Granskingarnevndin nú skipað. Vísindaráðið orðar yvirskipaðan granskingarpolitikk og raðfestir og tryggjar fígging. Í Vísindaráðnum sita politisk umboð, løgmaður og landsstýrismenn, umboð fyri vinnuna og umboð fyri granskingarumhvørvið. Í Granskingarnevndini, sum stjórnar granskingargrunninum, sita politiskt vald umboð og umboð, sum vinnan hevur valt.

Ein týðandi fortreyt fyri at menna føroyska gransking og útbúgving er at fáa í lag samstarv við ES. Landsstýrið hevur raðfest eitt tættari samstarv við ES um gransking og útbúgving, og fólk eru sett í Granskingarráðið, á Altjóða Skrivstovuna og í Mentamálaráðið at røkja og menna hetta samstarv. Tíverri er ikki eydnast at fáa formligar samstarvsavtalur í lag við ES enn, men vónandi kemur hetta undir land í næstum. Í meðan verður alsamt arbeitt við málinum. Uppbygd vera viðkomandi sambond við ES, vinnulívsfólk og granskarar í Føroyum verða kunnað um møguleikar í ES-rammuskráunum, og embætisfólk kunna seg við hesar stóru skráir. So hóast formligar avtalur ikki eru fingnar í lag við ES, so verða tíð og orka nýtt til neyðugar fyrireikingar.

## Lestrarstuðul

Við nýggju lógini, sum varð samtykt á tingi í vár, er veruliga bøtt um korini hjá lesandi forsyrgjarum. Fyrst kom barnsburðarfarloyvisskipanin fyri lesandi 1. januar í ár, og nú, 1. august, verður barnastudningurin settur í verk. Lesandi, sum eiga børn, fáa nú 600 kr. meira um mánaðin í studningi fyri hvørt barnið, tey eiga. Harumframt er rentan á lánum í lestrartíðini lækkað úr 4% niður í 2%, og møguligt er nú hjá teimum, ið lesa fulla tíð

uttanlands, men búgva í Føroyum, at fáa ferðastuðul. Eisini er vistarhaldsstuðulin munandi hækkaður, og øll lesandi undir 18 ár fáa nú fullan bókastuðul.

Longu fyrsta árið í samgonguskeiðinum varð settur í verk málskúlastuðul til lesandi uttan fyri Norðurlond og enskstalandi lond, og við nýggju lógini er nú eisini latið upp fyri, at stuðul kann veitast føroyingum, sum lesa í Norðurlondum, bæði til livikostnað og skúlagjald.

Tað gleðiliga er eisini hent, at skúlagjaldið fyri lesandi er lækkað munandi í øllum Stórabretlandi, har meira enn 100 føroyingar lesa. Hetta fer helst at hava við sær, at 3-4 ferðir so nógv lesandi kunnu lesa í Stórabretlandi fyri somu upphædd, sum í dag verður nýtt til hetta endamál.

## Mentan

Føroysk mentan er fjølbroytt og sterk og megnar ivaleyst at taka við teimum avbjóðingum, sum koma við alheimsgerðini. Men ávirkanin uttanífrá økist í hvørjum, og tí er neyðugt at vera á varðhaldi, tí samstundis, sum alheimsgerðin kann hava fyrimunir við sær, so er eyðsæð, at avbjóðingarnar fyri eina so lítla tjóð sum okkara eru stórar – ikki minst, tá ið vit hugsa um mentan og mál okkara.

Sjálvbodna arbeiðið er grundarsteinur undir stórum parti av mentanarlívinum um landið. Týdningurin av hesum arbeiði kann ikki metast nóg høgt. Alsamt fleiri kommunur leggja seg eftir at reka ein virknan mentanarpolitikk, og tað gevur úrslit.

Lóg um stuðul til mentan og list er farin at virka, og lóg um Miðlaráð er sett í gildi. Henda lógin er komin í staðin fyri lógina um filmseftirlit. Og arbeitt verður við at finna eina loysn, ið betrar um hølisviðurskiftini hjá Tjóðpalli Føroya.

Mentamálaráðið er í ferð við at orða yvirskipaðan mentanarpolitikk fyri børn og ung. Hetta skal gerast í samstarvi við m.a. dagstovnaøkið, fólkaskúlan, yrkislistabólkar og mentanarstovnar. Álit um hetta verður væntandi liðugt í 2008.

Eins og skotið er upp í Visjón 2015, er ætlanin at seta á stovn føroyskt mentanarráð, har ymisku listagreinarnar kunnu hittast fyri at samstarva og geva hvør øðrum íblástur. Ráðið skal ráðgeva tí politisku skipanini um mentanarpolitikk. Størri verkætlanir kunnu á henda hátt fremjast, og norðurlendskir stuðulsmøguleikar troytast. Norðurlandahúsið hevur fingið samskipandi og kunnandi leiklut í norðurlendskum mentanarsanstarvi, har okkara lista- og mentafólk eru við.

Málstevnunevndin fer at handa landsstýrismanninum uppskot um málpolitikk um ársskiftið. Hetta arbeiði fer óivað at vera til mikið gagn fyri mál og mentan okkara.

Fyrr í ár fekk landsstýrismaðurin handað ávegis álit um at varðveita hvalastøðina við Áir. Hvalastøðin er dømi um ídnaðarsamfelagið, ið tók seg upp síðst í 19. øld, og ta serstøku veiðumentan, ið knýtti seg at hesi vinnu. Við at varðveita hvalastøðina við Áir, varðveita vit part av einum mentanararvi, ið ikki bert hevur týdning fyri okkum føroyingar, men fyri nógv onnur eisini.

Víðskygdar leiðslur í Føroya Banka, og í síni tíð eisini í Sjóvinnubankanum, hava í eitt langt tíðarskeið savnað list, og í dag er hetta listasavn eitt hitt størsta savn av føroyskari list. Talan er um eitt einastandandi savn, ið lýsir listasøgu Føroya yvir eitt langt tíðarskeið og er ein virðismikil partur av mentanararvi føroyinga. Tað er tí at fegnast um, at landsstýrið og leiðsla bankans hava gjørt avtalu um, at savnið samlað kann verða varðveitt á almennum føroyskum hondum.

## Kringvarpið

2007 hevur verið eitt hendingaríkt ár fyri Kringvarp Føroya. 1. januar varð nýggj kringvarpslóg sett í verk, og nýggja kringvarpsstýrið fór til verka. Samanlagdi stovnurin kundi 6. februar hátíðarhalda 50-ára stovningardagin, og í heyst verður verklagslóg um at byggja út kringvarpshúsið í Sortudíki løgd fyri Løgtingið. Til tess at tryggja endamálið við stovninum og at bøta um innihaldið verður í ár gjørdur *public-service* sáttmáli millum Mentamálaráðið og kringvarpsstýrið.

## Ítróttur

Ítróttur hevur ómetaliga stóran mentanarligan og samfelagsligan týdning, og hugaligt er at síggja okkara ítróttafólk standa seg so væl í altjóða kappingum, og ÍSB-svimjararnir og ítróttafólkini á Special Olympics eru ein stoltleiki fyri okkara tjóð.

Í summar hevði stórur partur av bestu ítróttafólkum okkara høvi at royna seg á Oyggjaleikum, ið hesa ferð vóru á Rhodos, og lívgandi var at síggja, hvussu væl gekst. Tí vil landsstýrið eisini stuðla Ítróttasambandi Føroya, sum hevur boðið Føroyar fram sum vertsland fyri Oyggjaleikir í 2015, so at stóra fyrireikingararbeiðið kann byrja longu nú. Ein av fyrstu fyrireikingunum verður at leggja lóg um ítróttaanlegg fyri Løgtingið.

## Kirkjan

Eftir drúgt arbeiði og í samstarvi við politiska og kirkjuliga myndugleikan er nú komið á mál við arbeiðinum at yvirtaka fólkakirkjuna, og í dag, 29. juli 2007, verða fólkakirkjan og onnur trúarsamfeløg føroyskt málsøki. Fólkakirkjan verður nú formliga føroysk, og í framtíðini verða øll viðurskifti fyrisitin í Føroyum.

Arbeiðið at gera kirkjulóggávuna føroyska heldur fram. Tingið samtykti í maimánaði tvær av teimum týdningarmestu lógunum, tvær eru klárar at leggja fyri tingið, og lóggávuarbeiðið heldur fram í samstarvi við fylgibólkarnar, so at tað kann verða liðugt í hesi tingsetu.

## Norðurlendskt samstarv

Í limaskapsmálinum er støðan, at samstarvsráðharrarnir í vár gjørdu av at lata ein bólk av embætisfólki gera eina nærri útgreining av støðuni hjá teimum sjálvstýrandi londunum í norðurlendska samstarvinum. Bólkurin skal greina verandi støðu og koma við uppskoti um, hvussu luttøkan hjá sjálvstýrandi londunum kann økjast innan karmarnar av Helsingforsavtaluni. Bólkurin kemur við áliti fyri ársfundin hjá Norðurlandaráðnum, sum verður um mánaðarskifti oktober - november í Oslo.

Tað er einki at dylja yvir, at tað gongur trekt við sjálvum limaskapsmálinum. Hóast flestu limalond tykjast viðurkenna, at ongar fólkarættarligar forðingar eru fyri okkara limaskapi, so síggja hesi lond aðrar forðingar.

Nýggi bygnaður innan norðurlendska mentanarsamstarvið er nú komin í gildi. Mentamálaráðið hevur saman við norðurlendska ráðharrastovninum skipað fyri einum kunningarátaki í Norðurlandahúsinum fyri føroysk listafólk og mentanarstovnar við tí endamáli at brynja mentanarøkið til ta nýggju støðuna. Útbyggingin av Norðurlandahúsinum er byrjað, og ásannast má, at norðurlendsku mentamálaráðharrarnir hava sýnt Føroyum almikla vælvild í hesum máli. Útbyggingin fer at bøta munandi um umstøðurnar í húsinum og fer at verða til gagns fyri bæði mentanarlív og vinnulív.

# Almanna- og heilsumál

Fyri fyrstu ferð í Føroyum eru langtíðar strategiskar heildarætlanir lagdar fyri vælferðarøkið. Sera stórar avbjóðingar eru fyri framman, har alheimsgerðin trýstir búskapin, samstundis sum vaksandi krøv eru frá einstaklingum, familjum og arbeiðsmarknaði til góðar og smidligar almannatænastur. Við Visjón 2015 fyri vælferð er víst á týdningarmestu politisku virkisøkini til tess at kunna røkka aðalmálinum at tryggja eitt gott samfelag fyri øll.

Nøkur av úrslitunum, sum eru rokkin seinasta árið, eru hesi:

- Á eldarøkinum er talið á eldrabústøðum økt munandi kring alt landið. Verkætlanin við Tjarnargarði verður liðug stutt eftir ólavsøku, og fleiri aðrar byggingar verða fyrireikaðar í løtuni. Dagtilboð fyri minnisveik er sett á stovn í Havn, og nýtt tilboð á hesum øki verður fyrireikað í Klaksvík
- Møguleikin fyri framhaldandi stuðli til fólk, sum hava fylt 66 ár, er fingin til vegar. Eisini er reglugrundarlagið undir stuðli til avlamisbil og bústaðarbroytingar dagført
- Stuðulsskipanin fyri børn við serligum tørvi er farin at virka. Uppgávubýtið millum almanna- og útbúgvingarverkið er fastlagt. Eitt integrerað tilboð til fjølbrekað smábørn er skipað á Sernámsdeplinum, og stuðulsstovur eru settar á stovn sum liður í tænastuni til fjølbrekað børn
- Ein fólkaheilsuætlan er orðað, og skipað hevur verið fyri tveimum ráðstevnum í sambandi við ætlanina. SSP-samstarv millum skúlaverk, sosialar myndugleikar og politi er liður í hesum. Fyribyrgingarráðið hevur sett stóra heilsukanning í verk til tess at fáa greiðu á heilsustøðu føroyinga. Ein fruktskipan hevur verið roynd í skúlunum við góðum úrslitum, og uppgávan at halda fram liggur nú hjá kommununum. Skipað hevur verið fyri árligu fólkaheilsurenningini kring landið
- Ílegugransking er sett á stovn, og komið er væl áleiðis við ættarbandskránni. Fyrstu verkætlanirnar á hesum øki eru settar í verk
- Aðalorðaskifti hevur verið um framtíðar sjúkrahúsverk, og breið politisk semja er um ætlan at uppraðfesta og framtíðarmenna sjúkrahúsverkið
- Nýggj læknavakt er fingin at virka fyri alt meginøkið, og er hetta ein stór nýskapan fyri trygdina í primeru heilsutænastuni. Skipað er nýggj ljósmøðratænasta, sum skapar betri samanhang í føðiskipanini í Føroyum
- Talgilda heilsuskipanin er tikin í nýtslu, og eftir ætlan fara allar eindir í heilsuverkinum at brúka skipanina við árslok 2008. Samskiftismøguleikarnir eru batnaðir munandi við skipanini, sum eisini fevnir um rannsóknarstovu- og røntgenkanningar
- Álit um apoteksverkið er latið landsstýrismanninum. Farið er undir at dagføra umstøðurnar at gera heiligvág í Føroyum
- Lógargrundarlag er fingið til vegar til tess at skipa bútilboð til heimleys í tøttum samstarvi við sjálvbodnar felagsskapir

## Almannaøkið

Forsorgarlógin er ein av grundarsteinunum undir okkara vælferðarskipan, og tí hevur tað alstóran týdning, at tilgongdin og endaliga úrslitið hava breiða undirtøku. Almanna- og heilsumálaráðið leggur í løtuni arbeiðið til rættis við nýggju forsorgarlógini, sum verður skipað við fakligum stýrisbólki við eitt nú brúkaraumboðum. Skipaður verður eisini politiskur fylgibólkur við umboðum úr øllum flokkum og umboðum fyri kommunurnar.

Ynski landsstýrisins er, at fólk við skerdum førleika skulu gerast partur av vanliga arbeiðsmarknaðinum, har hetta ber til. Til tess eru gjørdar almennar skipanir við endurbúgving og vardum størvum, og Almannastovan hevur við eini arbeiðsmarknaðardeild lagt dent á at styrkja hesar skipanir. Hóast hetta er tað sannroynd, at tað er torført hjá fleiri at koma á arbeiðsmarknaðin. Fyri at bøta um hesi viðurskifti er neyðugt at seta munagóð tiltøk í verk.

- Ein liður í hesum er at broyta skipanina við endurbúgving, eitt nú soleiðis at stuðul verður veittur uttan mun til inntøku og ognarviðurskifti hjá hjúnafelaga
- Annað er at lækka mótrokningina í pensjónini av aðrari inntøku úr 60% niður í 30%, soleiðis at tað skal loysa seg betur at arbeiða. Frá 1. januar 2008 skal inntøkuloftið hjá lægstu fyritíðarpensjónistum hækkast. Frá 1. januar 2008 fáa hesir viðbót, ið svarar til hálva avlamisviðbót hjá miðal fyritíðarpensjónistum, og frá 1. januar 2009 fulla avlamisviðbót. Við støði í hesum tiltøkum verður lægsta fyritíðarpensjón avtikin 1. januar 2009

## Familjupolitisk átøk

Landsstýrismaðurin er sinnaður at tryggja tímaløntum arbeiðstakarum á privata arbeiðsmarknaðinum partvísan inntøkumiss í sambandi við fráveru frá arbeiðinum orsakað av barnsins fyrsta sjúkudegi. Hetta skal gerast við sjúkradagpeningalógini, ið skal broytast samsvarandi. Uppskotið verður væntandi lagt fyri Løgtingið í september.

Løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar verður broytt, so at serstakt barnaískoyti verður veitt støkum uppihaldarum. Barnaískoyti verður latið eftir umsókn, har umsøkjarin ger tað sannlíkt, at hann er stakur. Barnaískoytið verður eftir ætlan 6.000 kr. um árið til hvørt barnið.

Ráðgevandi toymi til kvinnur verður skipað. Ráðgevingin skal fevna um upplýsing um fyribyrging, viðtalu við kvinnur, ið umhugsa ella hava fingið fosturtøku, og ráðgeving til barnakonur og stakar uppihaldarar, ið liva undir truplum viðurskiftum og hava tørv á serligum stuðli.

## Eldrapolitisk átøk

Eitt eldrapolitiskt tiltak, sum verður fyrireikað, er at hækka serligu viðbótina til ávísar pensjónistar. Endamálið er at lætta um ta eyka byrðu, ið hækkaðu oljuprísirnir hava lagt á pensjónistar.

Landsfelag pensjónistanna hevur fleiri ferðir sett fram ynski um at skipa ókeypis koppseting ímóti influensa fyri øll fólk, ið eru 67 ár og eldri. Somuleiðis hevur landslæknin mælt til at gera slíka skipan, eins og gjørt verður í grannalondum okkara. Landsstýrið ætlar at seta í gildi tilíka ætlan, sum skal virka á heysti 2007.

## Pensjónshækkingar

Stórar hækkingar í pensjónsupphæddunum til fólkapensjónistar eru framdar hesi árini, serliga við broytingum í samhaldsfasta, har aftur stór hækking verður framd frá 1. jan. 2008. Í hesum samgonguskeiði verða soleiðis fólkapensjónin og samhaldsfasti tilsamans fyri støk hækkað úr 7.410 kr. mán. til 9.345 kr. mán., t.e. við 1.481 kr. mán., svarandi til 22%, og fyri hjún, bæði pensjonistar, verður hækkingin úr 11.958 kr. mán. til 15.633 kr. mán., t.e. við 2.818 kr. mán., svarandi til 25%. Hetta er galdandi, tá ikki verður mótroknað í viðbótini av aðrari munandi inntøku.

## Bústaðarpolitisk ætlan

Bústaðarpakkin verður nú settur í verk. Lógaruppskot um lutaíbúðafeløg verður ætlandi lagt fyri Løgtingið umleið hálvan august. Samstundis arbeiðir Fíggjarmálaráðið við fylgilóggávu, sum hevur til endamáls at javnseta lutaíbúðafeløgini við privatfólk, ið byggja sethús, við at gera neyðugar tillagingar í MVG- og rentustuðulsskipanini.

Lógin um lutaíbúðafeløg skal eisini vera karmur um serlig lutaíbúðafeløg, ið eru ætlað at standa fyri bústøðum til fólk við serligum tørvi. Við at skipa privatar bústaðir sum vanlig lutaíbúðafeløg, fáa fólk við láginntøkum betri møguleikar at seta føtur undir egið borð. Somuleiðis fáa eldri fólk høvi at skifta hús síni um við minni bústaðir. Harvið verður skapt eitt størri umskifti á bústaðarmarknaðinum.

Húsalánsgrunnurin, Íbúðargrunnurin og Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin verða umskipaðir til alment bústaðarpartafelag, sum m.a. skal fíggja bústaðir til fólk við serligum tørvi. Nýggja bústaðarpartafelagið skal eisini veita avdráttarfrí lán til bjálving og orkusparandi tiltøk til fólka- og fyritíðarpensjónistar, sum búgva í egnum bústaði. Fyri at gagnnýta bústaðartilfeingið sum best, verður harumframt nýggj leigulóg løgd fyri tingið.

## Vælferðarráð

So sum tað er lýst í Visjón 2015 fyri vælferð, er ætlanin at fara undir at skipa eitt vælferðarráð. Ráðið skal m.a. vera við til at menna orðaskiftið um vælferðarpolitiskar spurningar í Føroyum; skal gera viðmerkingar, seta kanningar í verk, umrøða avleiðingar av førdum politikki í einum langtíðarhøpi og veita ráð um prinsippiellar, etiskar og søguligar tættir í vælferðarorðaskiftinum.

## Fólkaheilsa

Fólkaheilsuætlanin hevur fingið dygga undirtøku allastaðni. Á stórari ráðstevnu í vár varð lagt fram og umrøtt, hvussu vit ítøkiliga fara ígongd við at seta fólkaheilsuætlanina í verk á øllum raðfestum økjum, so sum viðvíkjandi rørslu, kosti, royking, rúsevnismisnýtslu, heilsukanningum og støðulýsingum av heilsustøðu føroyinga; á fleiri økjum er gongd komin á.

Sum ein liður í strembanini eftir støðugt at menna arbeiðið við at betra um fólkaheilsuna hjá føroyingum, ætlar landsstýrismaðurin at menna Fyribyrgingarráðið til eitt Fólkaheilsuráð. Ætlanin er, at Fólkaheilsuráðið verður mannað við eini breiðari fjøld av fakfólki og myndugleikapersónum enn núverandi Fyribyrgingarráð. Seinni er ætlanin at seta á stovn ein føroyskan fólkaheilsustovn, sum serliga skal taka sær av hesum týdningarmikla arbeiði.

## Alment roykibann

Ásannandi, at royking er sera heilsuskaðilig, hevur landsstýrið sett sær fyri at fremja tiltøk, sum miðvíst og stigvíst hava til endamáls at minka um tubbaksnýtsluna. Til tess at verja starvsfólk móti heilsuskaðiligu árinunum av royking, er ásett í tubbakslógini, at loyvt er ikki at roykja á almennum stovnum og virkjum. Tíðin er nú komin til at víðka hesa áseting, so hon eisini fevnir um matstovur, skeinki- og dansistøð og privat arbeiðspláss, har fleiri enn eitt fólk starvast. Uppskot verður tí sett fram í heyst um at broyta tubbakslógina, so at frá 1. jan. 2008 verður ikki loyvt at roykja í almenna rúminum.

## Framtíðar sjúkrahúsverk

Í álitinum um framtíðar sjúkrahúsverk í Føroyum verður dygdarhugtakið nýtt sum yvirskipað tilgongd, og 30 tilmæli eru, sum skulu tryggja, at veitingarnar eru so dygdargóðar, sum til ber, og at ein fær sum mest og best burtur úr tilfeinginum innan fyri givnar karmar. Politikarar, fakfólk og sjúklingar hava tikið sera væl ímóti álitinum, og arbeitt verður nú ítøkiliga við at seta tað í verk.

Nøkur av tilmælunum eru longu sett í verk ella eru um at vera tað. Fyri fyrstu ferð verður eitt nú sjúklinganøgdsemiskanning gjørd í Føroyum, tí í maimánaði fingu umleið 1.000 sjúklingar sendandi spurnablað um, hvussu teir hava upplivað tær veitingar og tænastur, ið teimum eru givnar á føroyskum sjúkrahúsum. Tílíkar sjúklinganøgdsemiskanningar skulu gerast annaðhvørt ár.

## Krabbameinsvirkisætlan

Í augustmánaði er ætlanin at fara undir arbeiði at gera krabbameinsvirkisætlan fyri Føroyar. Í slíkari virkisætlan eru ávís tilmæli um, hvussu ein bøtir um fyribyrging, kanning, viðgerð og endurmenning, og gjørdir verða eisini nágreiniligir málsetningar.

## Endurvenjing og rehabilitering

Sum ein partur av Visjón 2015 um vælferð, er støðan raðfest hjá teimum, sum orsakað av sjúku ella breki hava brúk fyri endurmenning – ella rehabilitering. Støðan er ikki góð í dag, og hetta er ikki nøktandi, og tí hevur landsstýrið sett sær fyri at samskipa økið betur, soleiðis at tilfeingið verður gagnnýtt so væl sum møguligt. Ein verkætlanarbólkur fer at handa landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum álit um endurvenjing innan 1. september 2007.

## Nýggj sjúkrakassaskipan

Landsstýrismaðurin leggur beint eftir ólavsøku fram uppskot til nýggja sjúkrakassalóg. Við uppskotinum verða eitt nú allir sjúkrakassarnir savnaðir í ein sjúkrakassa, soleiðis at sjúkrakassagjaldið verður tað sama í øllum landinum.

## Psykiatriska økið

Ríkislógartilmæli um at seta í gildi nýggja psykiatrilóg fyri Føroyar verður væntandi lagt fyri Løgtingið í oktober. Við hesum verður verandi lóg frá 1938 skift út við eina meiri tíðarhóskandi lóg um rættindi hjá sálarsjúklingum í psykiatriskari viðgerð.

Seinnu árini hevur verið arbeitt miðvíst við at skipa heildarpsykiatri í Føroyum. Á Psykiatriska deplinum verður arbeitt við at dagføra viðgerðartilboðini, millum annað við at leggja meira um til ambulantar viðgerðir, gera viðgerðarætlanir fyri sjúklingar og dygdarmenna viðgerðarskipanina, og farið er undir at skipa serstaka barna- og ungdómspsykiatri. Stuðulsskipan fyri sinnisveik er sett á stovn, sambýlir til sinnisveik eru fingin til vegar, og bygginevnd er sett at fyrireika búpláss til brúkarar, ið hava serligan tørv á hjálp.

### Byggivirksemi

Arbeiðið at bøta um umstøðurnar á Landssjúkrahúsinum heldur fram út frá heildarætlanini og verklagslógini. Uppskot at nútíðargera psykiatrisku deildirnar á sjúkrahúsinum er um at vera liðugt, og í heyst verður farið at fyrireika uppíbyggingina í B-bygningin. Byggivirksemið hevur verið nakað tarnað av økta eftirspurninginum eftir arbeiðsmegi í byggivinnuni, og hetta hevur eisini havt við sær kostnaðarhækkingar. Landsstýrismaðurin fer í heyst at leggja fram uppskot til broytta verklagslóg út frá eini dagførdari heildarætlan.

Í heyst verður væntandi farið at byggja sambýlið fyri sálarsjúk í Havn, og liðugt verður um einar 16 mánaðir. Landsstýrið hevur í sambandi við verkætlanina at byggja ellis- og røktarheim í Vági gjørt av at byggja økisdepil fyri sinnisveik í sama øki. Hetta er liður í heildarpsykiatriætlanini fyri Føroyar. Í Klaksvík eru hús keypt at nýta til bústaðar- og umlættingartilboð til autistar. Við hesi loysn er mett, at eitt nøktandi tilboð er veitt á hesum øki.

### Talgildingin á almanna- og heilsuøkinum

Nýggja KT-heildarskipanin til Almannastovuna er í útboði, og sáttmáli verður undirskrivaður við veitara í heyst. Verklagslógin, sum varð samtykt fyrr í ár, fevnir um fyrra part av heildarætlan, har endamálið er at talgilda alt virksemið á Almannastovuni og at nútíðargera umsitingina av almannaveitingum.

Á heilsuøkinum er eisini brotið upp úr nýggjum við fleiri verkætlanum til tess at kunna røkka visjónini um eitt talgilt, samskipað og betri heilsuverk. Nú er komið á mál við talgildingini av røntgen- og rannsóknarskipanunum, so samstarvast kann um alt heilsuverkið á hesum økjunum.

Stóra og slóðbrótandi verkætlanin um Talgilda heilsuskipan er komin so langt, at skipanin nú so líðandi verður tikin í nýtslu, og málið er, at allar eindir í heilsuverkinum brúka skipanina við árslok 2008.

# Innlendismál

### Útlendingamál

Í eini tíð við metlágum arbeiðsloysi kann staðfestast, at tørvur er á útlendskari arbeiðsorku á flestu økjum, og til tess at fáa støðugan búskaparvøkstur, er neyðugt at greiða henda trupulleika. Landsstýrið arbeiðir tí við at finna eina smidliga loysn til at flyta inn útlendska arbeiðsmegi. Ætlanin er at leggja uppskot til ríkislógartilmæli um "Lov om visse udlændinges adgang til beskæftigelse på Færøerne" fyri Løgtingið í augustmánað.

Útlendingamál eru danskt málsøki. Tí verður uppskotið, eftir at Løgtingið hevur samtykt tað, lagt fyri Fólkatingið. Ætlanin er, at skipanin skal koma í gildi 1. januar 2008. Sambært uppskotinum kunnu ES-ríkisborgarar fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum, um teimum verður boðin í minsta lagi 30 tíma arbeiðsvika fyri somu løn, ið avtalað er á føroyska arbeiðsmarknaðinum fyri sama arbeiði.

Harumframt verður heimild fingin til vegar fyri at heimila sonevndum vikarstovum at flyta inn og leiga út ES-arbeiðsmegi í Føroyum sambært teimum treytum, ið galda á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Skipanin er lík teirri skipan, ið danir nýta til at flyta inn arbeiðsmegi

úr teimum nýggju ES-londunum. Við nýggju skipanini verður munandi lættari og skjótari at fáa arbeiðsmegi úr ES-londum til Føroya.

Ein av stóru trupulleikunum við útlendingamálinum er, at vit hava ongar neyvar reglur fyri, hvussu vit skulu umsita útlendingalógina. Arbeitt verður tí við at gera eina útlendinga-kunngerð, sum eftir ætlan kemur í gildi seinni í ár. Greiðast hevði verið at yvirtikið málsøkið útlendingamál.

## Ríkislóggáva

Fyri góðum ári síðan heitti landsstýrið á ríkismyndugleikarnar um at gera uppskot til kongliga fyriskipan, ið setur *værgemålsloven* í gildi fyri Føroyar. Rikismyndugleikarnir hava nú boðað frá, at uppskot verður sent Innlendismálaráðnum í næstum, og ætlanin er at leggja uppskotið fyri Løgtingið í heyst. Lógin um verjar, ið kemur í staðin fyri myndugleikalógina, snýr seg í stuttum um rættarstøðuna hjá persónum, ið ikki eru førir fyri at røkja egin áhugamál.

Landsstýrið hevur somuleiðis heitt á ríkismyndugleikarnar um at gera uppskot til kongliga fyriskipan, ið setur í gildi endurgjaldsábyrgdarlógina og uppskot til nýggja revsilóg fyri Føroyar. Ætlanin er at leggja uppskotini fyri Løgtingið í heyst.

## Strandfaraskip Landsins

Strandferðslan fyrireikar seg at flyta til Tvøroyrar, og ætlanin at gera tað bíligari at ferðast um firðir og sund er sett í verk. Fyri ferðafólk eru prísirnir farnir niður í helvt, og akførini gjalda 22% minni. Arbeitt hevur verið miðvíst við at betra um ferðaætlanina og er títtleikin øktur á fleiri leiðum í tøttum samstarvi við fólk á staðnum.

Økta siglingin á Nólsoyar- og Kalsoyarleiðini byrjaði 10. februar, og økta siglingin á Suðuroyarleiðini byrjaði 16. juli. Ritan siglir nú 10 fleiri túrar. Túratalið er økt serliga um vikuskiftini, og ein seinur túrur er nú hvønn dag í viku. Túratalið á Nólsoyarleiðini er 46 um vikuna Sam siglir nú seks túrar fleiri. Ein seinur túrur er nú hvønn dag í viku, og ein túrur tíðliga seinnapart er eisini hvønn dag. Túratalið á Kalsoyarleiðini er nú 47 um vikuna. Hjá Smyril eru broytingarnar, at tríggir túrar vera mánadag og mikudag, og ein hálvur túrur fríggjadag og leygardag. Hetta hevur so eisini við sær, at Smyril liggur nátt í Havn, fríggjakvøld.

Í heyst verður eitt nýtt útbjóðingarumfar fyri koyringina á Bygdaleiðum, og í heyst verður eisini farið miðvíst undir arbeiðið við nýggjum skipi til Nólsoyarfarleiðina.

## Kommunumál

Tær sjey eindirnar, sum kommunurnar kunnu leggja saman í ella samstarva í, eru nú ásettar. Í heyst verður roknskaparkunngerðin fyri kommunurnar lýst, og samstundis hava kommunurnar fingið í boði at nýta roknskaparskipan landsins við egnum kommunalum roknskapardømi.

Í heyst er ætlanin at tosa við kommunurnar um, hvussu uppgávu- og ábyrgdarbýtið eigur at verða skipað millum land og kommunur. Úrslitið av hesum verður avgerandi fyri, hvussu ein kommunal útjavningaskipan verður háttað.

## Umhvørvis-, lendis- og náttúrumál

Umhvørvis-, náttúru- og lendismál hava síðan 2004 verið partur av málsøkinum hjá landsstýrismanninum í innlendismálum. Yvirskipaða ábyrgdin av hesum tætt knýttu málsøkjum er harvið savnað á einum stað.

Í vár varð avgerð tikin um at seta á stovn felags náttúru-, umhvørvis- og lendisfyrisiting. Henda er nú skipað sum sjálvstøðugur stovnur undir Innlendismálaráðnum. Í nýggja stovninum eru seks umsitingar savnaðar undir einari leiðslu. Hesar eru Umhvørvisdeildin á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Skógrøkt Landsins, Matrikulstovan, Tinglýsingarstovan, Føroya Náttúrugripasavn og Landsfólkayvirlitið. Við hesum hava vit fingið eina fyrisiting, sum fakliga er før fyri at fremja ætlanir í verki, og sum kann vera við til at tryggja, at lóggávan verður hildin og dagførd við jøvnum millumbilum.

## Altjóða umhvørvissáttmálar

Støða Føroya til Kyoto-frumskjalið hevur verið viðgjørd á Løgtingi í vár, og breið semja er um, at skjalið eisini skal galda fyri Føroyar. Í hesum sambandi hevur Innlendismálaráðið samband við danskar myndugleikar fyri at fáa eina nágreining av treytunum fyri at staðfesta skjalið. Ætlandi verður uppskot til samtyktar um at staðfesta Kyoto-frumskjalið lagt fyri tingið í heyst.

Ein bólkur við umboðum úr m.ø. Innlendismálaráðnum og Løgmansskrivstovuni er settur at fyrireika og lýsa, hvat er neyðugt og gjørligt fyri at fremja eitt samskipað átak á økinum. Henda útgreining verður løgd fyri Løgtingið saman við uppskotinum til samtyktar um at taka av fyrivarni viðvíkjandi Kyoto-frumskjalinum.

Føroyar hava í 2001 tikið undir við sonevndu POP-protokollini og HM-protokollini, ið seta forboð fyri nýtslu, framleiðslu, innflutningi og útflutningi av eini røð av seinloysnum, lívrunnum dálkingarevnum og ávísum tungmetalum. Hesar protokollir eru ikki settar í verk í galdandi føroyskari lóggávu. Fyri at tryggja, at heimild er fyri at seta nevndu forboð viðvíkjandi hesum evnum og metalum, verður uppskot lagt fyri Løgtingið í heyst um broytingar í umhvørvisverndarlógini.

## Býarskipanarlóg

Galdandi lóg um býarskipanir og byggisamtyktir er ótíðarhóskandi og hevur tørv á at verða endurskoðað. Innlendismálaráðið er farið undir innanhýsis fyrireikingar av hesum arbeiði. Somuleiðis er farið at fyrireika serliga byggireglugerð, ið skal hava gildi fyri allar kommunur. Eitt av endamálunum við reglugerðini skal vera at tryggja, at allir bygningar verða bjálvaðir á besta hátt. Ætlandi verður arbeiðsbólkur við umboðum frá t.d. kommunufeløgunum og viðkomandi landsmyndugleikum settur at endurskoða lóggávuna og at fyrireika uppskot til serligu reglugerðina. Hetta verður ætlandi fyrst í komandi ári.

## Náttúruverndarlóg

Innlendismálaráðið arbeiðir í løtuni við at fyrireika uppskot til nýggja náttúruverndarlóg, og uppskotið verður eftir ætlan lagt fyri Løgtingið tíðliga í heyst. Nýggja lógin skal tryggja og skipa føroyska náttúruvernd við eini meiri virknari og framfúsari fyrisiting av økinum. Ætlanin er, at henda fyrisiting skal byggja á umhugsni fyri lívøkjum, lendi, lívi, mentan og náttúrunnar mergfeldi heldur enn fyri vakurleika og sjáldsemi einans, soleiðis sum galdandi lóg fyriskipar.

Talan verður sostatt um eitt skifti frá tí fagurfrøðiliga til tað meira lívfrøðiliga og jarðfrøðiliga, og eitt skifti frá forboðum og loyvum í ítøkiligum førum til miðvísa vernd og varðveitslu í góðari tíð.

## Tinglýsingin

Í desember 2006 varð arbeiðið at gera eina føroyska EDV-tinglýsingarskipan útboðið, og sambært sáttmálanum millum Innlendismálaráðið og veitaran skal nýggja skipanin vera klár 1. januar 2008. Tá nýggja tinglýsingarskipanin er farin at virka, flytur Tinglýsingarstovan úr leigaðu hølunum hjá Føroya Rætti og út í gamla posthúsbygningin á Argjum, har náttúru-, umhvørvis- og lendisstovnurin húsast.

## Fólkayvirlit

Nú Løgtingið hevur samtykt nýggja lóg um fólkayvirlit, verður farið undir at fyrireika verkætlanina at menna nýggja telduskipan til Landsfólkayvirlitið, soleiðis at nýmótans tøkni kann nýtast at skráseta og veita upplýsingar úr skránni hjá fólkayvirlitinum. Hetta verður umfatandi skipan, ið helst má mennast í fleiri stigum og setast í verk yvir eitt áramál. Ætlanin er, at tann parturin av verkætlanini, ið snýr seg um detailprojektering og fyrireiking av útboði, verður klárur innan árslok.

# PARTUR III

# Løglisti

## Løgmansskrivstovan

- **Frágreiðing løgmans um uttanríkismál**
  Endamálið er at skifta orð um uttanríkismál Føroya.

- **Uppskot til Løgtingslóg um at broyta ræði á málum og málsøkjum**
  Endamálið er at taka yvir vinnulóggávuna.

- **Uppskot til samtyktar um at staðfesta Kyotosáttmálan**
  Endamálið er at seta í gildi Kyotosáttmálan.

- **Uppskot til samtyktar um at verja osonlagið**
  Endamálið er at góðkenna, at landsstýrið mælir ríkismyndugleikunum til at strika fyrivarnið Føroya í "bekendtgørelse nr. 6 af 19/02/2004 om Danmarks godkendelse af Montreal-protokollen af 16. september 1987 om stoffer, der nedbryder ozonlaget, som ændret ved parternes efterfølgende møder den 17. september 1997 og 3. desember 1999." (Montreal 1997 broyting og Beijing 1999 broyting).

- **Aðalorðaskifti um Visjón 2015**
  Endamálið er at skifta orð um búskaparlig viðurskifti, og hvussu vit tryggja vælferðina hjá øllum borgarum.

## Fíggjarmálaráðið

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um kapitalvinningsskatt**
  Endamálið er at gera ásetingar um starvsfólkapartabrøv.

- **Uppskot til løgtingslóg um eftirløn**
  Endamálið er at tryggja øllum ein virðiligan aldurdóm.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta rentutryggingarlógina**
  Endamálið er at dagføra skatta- og frádráttarheimildir í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um rentustuðul**
  Endamálið er at endurskoða og tillaga lógina til bústaðarmarknaðin.

- **Uppskot til løgtingslóg um stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði**
  Endamálið er at endurskoða og tillaga lógina til bústaðarmarknaðin.

- **Uppskot til løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum**
  Endamálið er at leggja partar av virðisgrundaða avgjaldinum í galdandi lóg um til umhvørvisgjald og at fremja aðrar broytingar og dagføringar

- **Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar Lov om finansiel virksomhed**
  Endamálið er at gera dagføringar í lógini um fíggjarligt virksemi.

- **Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme"**
  Endamálið er at gera ásetingar um tiltøk ímóti hvítvaski o.ø. fyri yvirtikin málsøki.

- **Uppskot til løgtingslóg um íløgufeløg**
  Endamálið er at gera dagføringar.

- **Uppskot til løgtingslóg um virðisbrævahandil**
  Endamálið er at gera dagføringar.

- **Uppskot til løgtingslóg um toll- og skattafyrisiting**
  Endamálið er at endurskoða Toll- og skattafyrisitingarlógina.

- **Uppskot til løgtingslóg um elektroniskar fakturar**
  Endamálið er at gera reglur og mannagongdir, tá ið rokningar hjá tí almenna verða sendar elektroniskt.

- **Dupultskattaavtala við Bretland**
  Uppskot verður lagt fram um dupultskattaavtalu við Bretland.

- **Uppskot til løgtingslóg um kapitalgrunn**
  Endamálið er at skipa ein grunn, har inntøkur frá einskiljingum og inntøkur frá eini møguligaru oljuvinnu verða settar í.

## Fiskimálaráðið

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap**
  Endamálið er at áseta fiskidagar fyri fiskiárið 2007/2008.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um at manna skip**
  Endamálið er at endurskoða og dagføra reglurnar um manning av skipum.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um trygd á sjónum**
  Endamálið er at broyta revsitilgongdina í sambandi við brot á lógina um trygd á sjónum.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um bjargingarútgerð á opnum bátum og førum undir 20 tons (BT)**
  Endamálið er at geva Fiskiveiðieftirlitinum heimild at geva fyrisitingarligt sektaruppskot.

- **Uppskot til løgtingslóg um at byggja nýggj hølir til Trygdarmiðstøðina í Klaksvík**

- **Uppskot til samtyktar um at gera broytingar í NEAFC sáttmálanum**
  Endamálið er at dagføra sáttmálan.

## Vinnumálaráðið

- **Uppskot til løgtingslóg um fast samband millum Sandoynna og Streymoynna**
  Endamálið er at geva landsstýrismanninum heimild at stovna partafelag, ið skal gera undirsjóvartunnil millum Sandoynna og Streymoynna við tilhoyrandi vegum, og sum skal hava raksturin av tunlinum um hendi.

- **Uppskot til løgtingslóg um talgildar undirskriftir**
  Endamálið er at fremja trygga nýtslu av talgildum undirskriftum.

- **Ríkislógartilmæli um at broyta lóg fyri Føroyar um ársroknskap**
  Endamálið er at seta í gildi í Føroyum altjóða reglur um at lata inn ársroknskap.

- **Uppskot til løgtingslóg um marknaðarføring**
  Endamálið er at gera reglur um marknaðarføring og marknaðaratferð.

- **Uppskot til løgtingslóg um ognartøkuheimild til flogferðsluendamál**
  Endamálið er at veita landsstýrismanninum heimild at ognartaka lendi til flogferðsluendamál.

- **Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi lóg um loftferðslu**
  Endamálið er at dagføra karmarnar um flogferðsluna til Føroya og úr Føroyum.

- **Uppskot til løgtingslóg um grannskoðarar**
  Endamálið er at styrkja um sjálvræðið og kappingarførið hjá grannskoðarum, serliga í mun til útlendskar grannskoðarar.

- **Uppskot til løgtingslóg um havnir**
  Endamálið er at gera skilhaldsreglur fyri havnir og reglur um havnavirksemi, umframt um vernd av havnum.

- **Uppskot til løgtingslóg um trygging**
  Endamálið er at frælsisgera tryggingarmarknaðin í Føroyum.

- **Uppskot til løgtingslóg um aling av fiski o.t.**
  Endamálið er at dagføra og tillaga reglurnar, serliga viðvíkjandi loyvisveitan og møguligum loyvisgjaldi.

- **Uppskot til løgtingslóg um at leggja ognir og skyldur hjá Vága Floghavn í P/F Vága Floghavn**
  Endamálið er at heimila landsstýrismanninum at leggja virksemi, ogn, skuld, rættindi og skyldur hjá Vága Floghavn til P/F Vága Floghavn.

- **Uppskot til løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða**
  Endamálið er at dagføra og tillaga reglurnar á økinum, so at tær svara til líknandi lóggávu í øðrum Norðurlondum.

- **Uppskot til løgtingslóg um at stovna partafelag at byggja og reka granskaralund**
  Endamálið er at veita heimild at stovna partafelag, sum skal fyrireika, byggja og reka granskaralund.

- **Uppskot til løgtingslóg um at fyribyrgja fíggingar- og vinningshvítvaski í sambandi við yvirgang**
  Endamálið er at gera ásetingar um tiltøk ímóti hvítvaski o.ø. fyri yvirtikin málsøki (VMR).

## Mentamálaráðið

- **Aðalorðaskifti um gymnasialar miðnámsútbúgvingar**
  Endamálið er at fáa orðaskifti um, hvussu vit á besta hátt skipa gymnasialu miðnámsútbúgvingar í framtíðini. Álitið frá nevndini, ið endurskoðar gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar, verður grundarlag undir hesum orðaskifti.

- **Uppskot til løgtingslóg um gymnasialar miðnámsútbúgvingar**
  Endamálið er at gera bygnaðarligar karmar um framtíðar gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar.

- **Uppskot til løgtingslóg um kirkjunýtslu og kirkjulimaskap**
  Endamálið er at áseta reglur um, hvussu ein verður limur í fólkakirkjuni og hoyrir til kirkjusókn, hvussu ein loysir sóknarband til prest í aðrari kirkjusókn, og hvussu limaskapur endar. Harumframt eru reglur um, hvussu kirkjur kunnu verða nýttar, og hvør hevur ræðið á teimum.

- **Uppskot til løgtingslóg um valkirkjulið**
  Endamálið er at áseta reglur um hvussu limir í fólkakirkjuni kunnu taka seg saman at skipa, fíggja og reka valkirkjulið, ið ikki er tengt at ávísari kirkjusókn.

- **Uppskot til løgtingslóg um kirkjuráð og próstadømisráð**
  Endamálið er at áseta, hvussu kirkjuráð og próstadømisráð skipa seg og virka.

- **Uppskot til løgtingslóg um kirkjulig val**
  Endamálið er at áseta, hvussu ein velur kirkjuráð, próstadømisráð og stiftsstjórnarlimir.

- **Uppskot til løgtingslóg um at velja biskup**
  Endamálið er at áseta, hvussu kirkjuráð og prestar velja biskup.

- **Uppskot til løgtingslóg um størv í kirkjuni**
  Endamálið er at áseta, hvussu prestur verður kallaður og settur, hvørji størv, stiftsstjórn og kirkjuráðið annars kunnu seta, og hvussu. Harumframt eru reglur fyri, hvussu kirkjuráðið kann samsýna teimum, sum ikki eru í starvi, men røkja størri uppgávur í kirkjuni.

- **Uppskot til løgtingslóg um kirkjubygningar**
  Endamálið er at áseta, hvussu ein umsitur og røkir kirkjubygningar, og hvussu farið verður fram, tá ið kirkja verður bygd ella avtikin.

- **Uppskot til løgtingslóg um stuðul til ítróttaanlegg**
  Endamálið er at skipa studningin til ítróttaanlegg við lóg.

- **Uppskot til løgtingslóg um Føroya Lærda Háskúla**
  Endamálið er at nútímsgera Fróðskaparsetrið og at samskipa allar verandi og komandi akademiskar útbúgvingar í eitt føroyskt universitet.

- **Uppskot til løgtingslóg um læraraútbúgving**
  Endamálið er at nútímansgera læraraútbúgvingina og at lyfta hana upp á bachelorstig.

- **Uppskot til løgtingslóg um námsfrøðingaútbúgving**
  Endamálið er at nútímansgera pedagokútbúgvingina og lyfta hana upp á bachelorstig.

- **Uppskot til løgtingslóg um at byggja út kringvarpshúsið í Sortudíki**
  Endamálið er at fáa kringvarpinum hóskandi hølir.

## Almanna- og heilsumálaráðið

- **Uppskot til løgtingslóg um lutaíbúðir**
  Endamálið er at geva fólki við láginntøkum betri møguleikar at seta føtur undir egið borð.

- **Uppskot til løgtingslóg um bústaðapartafelag**
  Endamálið er m.a. at fíggja bústaðir til fólk við serligum tørvi.

- **Uppskot til løgtingslóg um leiguviðurskifti**
  Endamálið er at gagnnýta bústaðatilfeingið.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um almenna forsorg**
  Endamálið er at veita endurbúgvingarstuðul, ið er leysur av inntøku og ognarviðurskiftum hjá hjúnafelaga.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um at áseta og javna almannaveitingar**
  Endamálið er at hækka inntøkuloftið hjá lægstu fyritíðarpensjónistum frá 1. januar 2008. Inn á lægstu fyritíðarpensjón skal harumframt setast viðbót, ið svarar til hálva avlamisviðbót hjá miðal fyritíðarpensjónisti.

- **Uppskot til løgtingslog um at broyta løgtingslóg um almannapensjónir**
  Endamálið er m.a. at stimbra arbeiðshugin við at lækka mótrokningina í fyritíðarpensjónini av aðrari inntøku úr 60% niður í 30%.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta sjúkradagpeningalógina**
  Endamálið er at tryggja tímaløntum arbeiðstakarum á privata arbeiðsmarknaðinum endurgjald fyri inntøkumiss í sambandi við arbeiðsfráveru orsakað av barnsins fyrsta sjúkudegi. Sjúkradagpeningalógina verður broytt samsvarandi.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta í løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar**
  Endamálið er at gera ásetingar um barnaískoyti til stakar uppihaldarar.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar**
  Endamálið er at hækka viðbótina til ávísar pensjónistar.

- **Uppskot til løgtingslóg um ókeypis koppsetingar**
  Endamálið er at veita eldri yvir 66 ár ókeypis influensakoppseting.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta studningslógina um røktarheimsbygging**
  Endamálið er at hækka og dagføra tilsagnarkarmin.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um tiltøk at minka um tubbaksnýtsluna**
  Endamálið er at víðka ásetingina í tubbakslógini, so at tað m.a. ikki verður loyvt at roykja á matstovum, skeinkistøðum, dansistøðum og á privatum arbeiðsplássum.

- **Uppskot til løgtingslóg um fólkaheilsuráð**
  Endamálið er at menna Fyribyrgingarráðið til eitt fólkaheilsuráð.

- **Uppskot til løgtingslóg um nýggja sjúkrakassalóg**
  Endamálið er at leggja saman teir 11 verandi sjúkrakassarnar.

- **Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi nýggja psykiatrilóg fyri Føroyar**
  Endamálið er at gera ásetingarnar tíðarhóskandi.

- **Uppskot til løgtingslóg um at dagføra heilivágsframleiðsluna hjá apoteksverkinum**
  Endamálið er at geva apoteksverkinum heimild at halda fram við arbeiðinum at dagføra heilivágsframleiðsluna.

- **Uppskot til løgtingslóg um út- og umbygging av Landssjúkrahúsinum**
  Endamálið er m.a. at dagføra langtíðarætlanina, so at fyrivarni verður tikið fyri broytingum í byggiætlanunum.

- **Uppskot til løgtingslóg um at byggja heim fyri sálarsjúk í Havn**
  Endamálið er at fáa til vegar heimild at fara undir fyrra av tveimum byggistigum, sum til samans fara at útvega 16 búpláss til sinnisveik í Havn. Fyrsta byggistigið fevnir um 10 búpláss, og byggikostnaðurin er mettur til 16 mió. kr.

- **Uppskot til løgtingslóg um at byggja økisdepil í Suðuroy sum part av ellis- og røktarheiminum í Vági**
  Endamálið er at fáa til vegar heimild at byggja økisdepil í Vági við tilknýti til ellis- og røktarheimið.

## Innlendismálaráðið

- **Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi "forslag til Lov om visse udlændinges adgang til beskæftigelse på Færøerne"**
  Endamálið er at gera serligar reglur um at flyta til Føroya arbeiðsmegi úr ES-londum.

- **Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "værgemålsloven"**
  Endamálið er at fáa sett donsku "værgemålsloven" í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri Løgtingið á heysti 2007.

- **Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Straffeloven"**
  Endamálið við uppskotinum er at fáa eina dagførda revsilóg fyri Føroyar.

- **Uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd**
  Endamálið við uppskotinum er at tryggja og skipa føroyska náttúruvernd við eini meiri virknari og framfúsari fyrisiting av økinum.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta umhvørvisverndarlógina**
  Endamálið við uppskotinum er serliga at fáa heimild til at seta forboð fyri nýtslu, framleiðslu, innflutningi og útflutningi av eini røð av ávísum dálkingarevnum og tungmetalum.

- **Uppskot til ríkislógartilmæli at seta í gildi endurgjaldsábyrgdarlógina**
  Endamálið er at áseta reglur um endurgjald til persónar, ið hava verið fyri skaða.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtingslóg um val til Føroya løgting**
  Endamálið er at gera ymsar tekniskar broytingar í vallógini.

- **Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi lóg um fastognarkeyp**
  Endamálið er at regulera rættarligu viðurskiftini millum keypara og seljara í sambandi við keyp og sølu av fastari ogn.